**Kári Jespersen og Jens Pauli A. Nolsøe**

# Føroya søga 1940 – 1998

## Tráður til keldusavn

**Føroya Skúlabókagrunnur 2000, teldutøk útgáva 2005**

# Formæli

"Føroya søga 1940-1998. Tráður til keldusavn" er ætlað studentaskúlum og øðrum miðnámsskúlum í undirvísingini í søgu og samfelagslæru.

Keldurnar eru býttar sundur í tíggjuáraskeið. Tey eru 1940-49, 1950-59, 1960-69, 1970-79, 1980-89 og 1990-98. Hvørt tíggjuáraskeið er í ringbindi fyri seg.

Hvørt tíggjuáraskeið er síðan býtt sundur í fimm temu, sum eru tey somu í øllum tíggjuáraskeiðunum: altjóða viðurskifti, politisk viðurskifti, búskaparlig viðurskifti, sosial viðurskifti og mentanarlig viðurskifti. Til hvørt tema er ein inngangur skrivaður.

Øll tíggjuáraskeiðini eru skipað á sama hátt. Fremst í hvørjum bindi standa inngangirnir til temuni. Síðan kemur yvirlitið yvir keldurnar við tilvísing til síðutal, har ið keldan byrjar. Aftast standa so keldurnar.

Fyri at lætta um hjá lærarum og næmingum, so at teir fáa betri yvirlit yvir tilfarið, standa allir inngangirnir og øll kelduyvirlitini til alt tíðarskeiðið 1940-98 í einum ringbindi fyri seg.

Við at skifta keldurnar sundur í temu ber eisini til í undirvísingini at viðgera sama tema øll tíggjuáraskeiðini.

Tað kann verða neyðugt við hvørt at leita til upprunakelduna, t.d. á internetinum, ella á bókasavninum. Annars verður mælt til at fara til upprunakelduna, har ið hetta ber til.

*Høvundarnir*

**1940 – 1950**

## Altjóða viðurskifti

Síðan 16. øld og fram til seinna heimsbardaga var Evropa maktmiðdepilin í heiminum. Fleiri evropeisk lond framdu hjálandapolitikk, ið fram til seinna heimsbardaga í stóran mun var grundarlagið undir búskaparligu menningini í Evropa.

Í 1939 brast seinni heimsbardagi á og grundað á teirra landafrøðiligu og hermálsligu støðu vórðu Danmark og Føroyar hersettar í apríl 1940 av ávikavist Týsklandi og Onglandi. Henda støða vardi til krígslok í 1945. Danmark og Føroyar høvdu annars staðið uttanfyri allar hernaðarsamgongur síðan 1864.

Í 1945 vóru gomlu evropeisku heimsveldini útpínd og búskaparliga illa fyri og mistu tí sína gomlu maktstøðu. Eftir stóðu tvey nýggj heimsveldi, USA við fleirflokkaskipan og marknaðarbúskapi og Sovjettsamveldið við einflokkaskipan og ætlanarbúskapi. Hesi bæði heimsveldi, sum stóðu saman undir 2. heimsbardaga, høvdu ikki somu áhugamál í spurninginum um, hvussu framtíðarheimurin skuldi skipast.

Í 1947 - 49 grundaðist tí í Evropa ein tveypólsskipan t.e. ein vestursamgonga undir leiðslu av USA og ein eystursamgonga undir leiðslu av Sovjetsamveldinum.

12. mars 1947 helt amerikanski forsetin Truman røðu í kongressini. Vanliga verður sagt, at kaldakríggið byrjar við hesi røðu. Henda røða saman við Marshallætlanini um búskaparligu endurreisnina av Evropa gjørdist m.a. grundarlagið undir hernaðarsamgonguni Nato, ið varð stovnað í 1949.

Um somu tíð skipaði Sovjettsamveldið fyri, at londini í Eysturevropa fingu sonevnd fólkademokrati, t.e. sosialistiskar einflokkaskipanir við ætlanarbúskapum. Í 1955 stovnaði Sovjettsamveldið saman við eysturevropeisku londunum eina hernaðarsamgongu, Warsjavasamgonguna.

Danmark bleiv limur í Nato í 1949. Og hóast Føroya løgting bæði áðrenn og aftaná hetta hevði samtykt, at Føroyar skuldu haldast uttanfyri allar hernaðarsamgongur, vórðu Føroyar í desembur 1952 lýstar at verða limur í Nato. Hervið varð støða Føroya sum uttanveltað land slept.

**1940 - 1950**

## Politisk viðurskifti

Síðan 1821 høvdu Føroyar verið danskt amt. Fyrst undir einaveldinum og frá 1849 undir grundlógini. Í apríl 1940 kvettist alt samband millum báðar ríkispartarnar. Neyðugt var tí at greiða stjórnarviðurskifti Føroya sum skjótast. 25. apríl varð Merkið viðurkent sum føroyskt flagg, og 9. mei varð gjørd fyribils stjórnarskipan fyri Føroyar, Bráðfeingisskipanin. Løgtingið fekk lóggávuvaldið, landsnevndin saman við amtmanni fekk útinnandi valdið, og eisini varð stovnað serføroysk rættarskipan. Hervið varð settur sjøtul á at byggja upp eina landsumsiting í Føroyum.

Eftir kríggið bar ikki til at venda aftur til gomlu amtsskipanina, og í sonevnda Buhlsbrævinum 27. okt. 1945 viðurkendi danska stjórnin Bráðfeingisskipanina, og at hon framhaldandi skuldi vera í gildi, "til tess at endalig skipan er fingin í lag." Samstundis bjóðaði danska stjórnin føroyingum til samráðingar so skjótt løgtingsvalið 20. nov. 1945 var av.

Samráðingarnar vóru í Keypmannahavn várið 1946. Lítið spurdist burtur úr, m.a. av tí at føroyingar ikki møttu við felags samráðingaruppleggi. Tilboðið frá donsku stjórnini var lagt fyri løgtingið, men ongin avgerð fekst. Tí varð tilboðið, saman við uppskotinum um loysing, sent til fólkatkvøðu.

Meiriluti var 14. sept. 1946 fyri loysing. Men meðan ein meiriluti í løgtinginum fyrireikaði "bráðfeingis stjórnarreglur fyri Føroyar", sendi kongur tingið heim, og løgtingsval varð útskrivað. Valið gav øðrvísi løgtingssamanseting, sum í 1947 kom at samráðast við donsku stjórnina. Úrslitið av hesum samráðingum var heimastýrisskipanin frá 1. apríl 1948. Eftir heimastýrislógini varð fyrsta samgonga skipað, t.e. løgtingsmeiriluti, sum velur løgmann og landsstýri. Í fyrsta landsstýrinum vóru sambandsflokkurin, javnaðarflokkurin og sjálvstýrisflokkurin. Hesir flokkar verða enn kallaðir heimastýrisflokkarnir.

**1940 - 1950**

## Búskaparlig viðurskifti

Búskaparliga høvdu 1930-árini verið sera vánalig. Virðið á føroyska útflutninginum hevði alt 10 áraskeiðið mest sum staðið í stað. Seinni heimsbardagi broytti hetta so fullkomiliga. Øll vanlig marknaðarviðurskifti endavendust. Størsta fiskivinnutjóðin í Evropa, Noreg, var útistongd frá enska marknaðinum. Føroyar, Írland og Ísland vóru saman við bretum einastir á stóra bretska marknaðinum. Eisini vórðu sum fráleið næstan allir teir nýggjaru bretsku trolarnir tiknir til sjóverjuna.

Prísirnir á matvørum - ikki minst á fiski - fleirfaldaðust, og føroyski útflutningurin næstan seksfaldaðist frá 1938 til 1944. Í juli 1945 áttu føroyingar 2.792.000 £ í Bretlandi. Men vandasiglingin kostaði tó tí føroyska sjómanninum dýrt. Krígsárini fórust á sjónum 205 mans av krígsávum og sjóvanlukkum, og 25 skip vórðu søkt.

Fyri at tálma nýtsluna og byrgja upp fyri at búskapurin varð yvirupphitaður, varð á løgtingsfíggjarlógini yvirfíggjað í stórum. Yvirskotið varð saman við beinleiðis játtan á fíggjarlógini beint í Vinnulánsgrunnin, Sosialgrunnin, Ábyrgdargrunnin og Løgtingsins tiltaksgrunn. Ætlanin var, at pengarnir skuldu goymast til peningaliga ringar tíðir, men tá kríggið var av, høvdu grunnarnir longu lánt út tað nógva av hesum pengum, og í 1948 var komið á botn. Ein stórur partur av hesi øgiligu peningaupphædd, varð lántur út til skipakeyp. Beint eftir kríggið vórðu keypt umleið 50 snurrivádsskip og umleið 30 trolarar. Soleiðis at í 1948 høvdu føroyingar størsta trolaraflota í Norðurlondum, 37 trolarar (12.769 BRT). Harafturat áttu føroyingar einar 150 sluppir og skonnartir.

Undir krígnum kvettist eisini peninga- og valutasamband millum Føroyar og Danmark. Í staðin fyri danska tjóðbankan átók nýstovnaði føroyski Valutasentralurin sær ábyrgdina av valutaviðurskiftunum í Føroyum. Føroyar vórðu knýttar at sterlingbólkinum, og burtur úr hesum viðurskiftum skaptist ein serføroysk króna, sum frá juni 1940 til sept. 1945 fekk virðið 1 £ = 22.40 kr. Eftir donskum kravi fylgdi føroyska krónan aftur teirri donsku, tó var í undantaksførum møguleiki fyri at veksla til kursin, ið var galdandi undir krígnum. Eftir kríggið versnaði bretski búskapurin meiri enn tann danski og bretska pundið versnaði somuleiðis meiri enn danska krónan. Á sumri 1945 varð 1 pund sett at vera 19,34 kr. Henda gongd kom helst óvart á fleiri teirra, sum umsótu føroysku peninga- og gjaldoyraviðurskiftini. Orsaka av góðum vónum til bretska búskapin, høvdu føroyingar bundið so at siga alla sína uppsparing frá krígnum í bretskum pundum

Heystið 1945 royndi Torstein Petersen, stjóri Sjóvinnubankans, at veksla eftir undantaksregluni til krígskursin, men amtmaðurin noktaði fyri hesum. Burtur úr spurdist rættarsøk, sum Torstein Petersen vann.

**1940 - 1950**

## Sosial viðurskifti

Sosiala støðan var í 1930-árunum sera vánalig serliga á stórplássunum. Inntøkurnar høvdu verið smáar, umframt at ávíst arbeiðsloysi hevði valdað. Undir krígnum vuksu inntøkurnar stórliga, men tey skip, ið áður høvdu havt einar 18-20 mans, høvdu nú bara um 7 mans. Áður høvdu skipini fiskað kring Føroyar, undir Íslandi og Grønlandi, og fiskurin varð flaktur og saltaður umborð. Síðan var hann uppskipaður í Føroyum og virkaður til klippfisk. Føroyskir útgerðarmenn sendu skip síni til Íslands at keypa fisk frá íslendingum. Fiskurin varð fluttur feskur á bretska marknaðin og seldur fyri gylt av pengum. Av hesum gjørdist arbeiðsloysið sera stórt uppi á landi í Føroyum serliga millum kvinnurnar. Fyri mannfólkið var roynt at hjálpa uppá støðuna við at seta ígongd almenn arbeiði, m.a. vegagerð. Eisini nýtti enska hermegin nakað av fólki til at uppbyggja síni hervirki. Harafturat fóru 250 menn til Íslands at gera flogvøllin í Keflavík.

Kríggið ól upp í Føroyum eina sálarstøðu ella "fepur", sum minti um støðuna hjá gullgravarum í villmørkini. Ein heppin skipari kundi ein túr fáa fyri tað, eini hús kostaðu. Meðan ein óheppin maður kundi missa einastu ogn sína - lívið. Heimafólkið - serliga tey avvarandi - gekk í støðugum ótta. Fór hesin túrurin at gera tey rík ella kanska til einkjur og faðirleys? Heimafólkið hevði eisini aðrar orsøkir til krígsangist. Minur róku á land og brustu, og týsk bumbuflogfør vóru javnan yvir Føroyum. Tey skutu og sleptu bumbum, sum gjørdu stóran skaða, hetta serliga fyrru helvt av krígnum.

Umframt stríðið at lívbjarga sær sum frægast í gjøgnum krígsárini tóku nógvir føroyingar støðu til partarnar í krígnum og hugsjónir teirra. Mangan var harður orðadráttur millum manna, men sum fráleið tagnaðu tær røddir, ið talaðu fyri týskinum.

**1940 - 1950**

## Mentanarlig viðurskifti

Undir krígnum var á nógvum økjum lívligt kjak millum manna t.d. um mentanarviðurskifti. Støðan var serstøk. Samstundis sum útheimurin við bretska hervaldinum kom higar til lands, vórðu Føroyar avskornar frá meginpartinum av Evropa. Mentanarliga ávirkanin úr Bretlandi øktist samstundis sum tjóðskaparligi samleikin hjá føroyingum styrknaði. Hetta tí at Føroyar gjørdust meira sjálvbjargnar undir krígnum og av samskiftinum við íslendingar, sum tóku loysing frá Danmark í 1944.

Leitað varð tíðum aftureftir. M.a. byrjaðu teir skipaðu fornfrøðiligu útgrevstrarnir undir krígnum t.d. tann í Kvívík og mikið kjak var í bløðunum um føroysk virði og tær tjóðskaparligu hetjurnar Sigmund og Trónd.

Sum liður í menning og samansjóðing av føroysku tjóðini, vórðu ymisk stig tikin. T.d. var uppskot um føroyskt útvarp frammi á tingi. Nógv ítróttarfeløg vórðu stovnað kring landið. ÍSF varð stovnað í 1939, og føroyameistarakappingin í fótbólti byrjar í 1942. Føroysk list, skaldskapur og øll mentan annars verður sett høgt, t.d. fer løgtingið at gjalda "skalda- og sømdarpening". Nógv verður lagt fyri at gera føroyskt til undirvísingarmál. Annars man tað, at Merkið varð viðurkent sum føroyskt flagg, ímyndaliga vera størsta mentanarhendingin undir krígnum.

Undir krígnum vóru fleiri túsund bretskir hermenn í Føroyum og nærum allir í bestu árum. Tí var tað ikki løgið, at fleiri hundrað føroyskar gentur fóru at ganga saman við hesum hermonnum. Nógvar av hesum gentum fluttu til Bretlands saman við hermonnunum eftir kríggið.

**1950 - 1960**

## Altjóða viðurskifti

Fimtiárini vóru meir enn nakað annað tíðarskeið eftir kríggið merkt av kaldakrígnum. Undir seinna heimsbardaga høvdu vestanveldini og Sovjettsamveldið staðið saman í bardaganum móti fasismuni, men stutt eftir krígslok kom kinkur í teirra samstarv. Í 1947 kom Trumandoktrinin, 1948 Marshallhjálpin, og í 1949 varð NATO sett á stovn. Tiltøkini vóru liður í innibyrgingarpolitikkinum (containment) av Sovjettskommunismuni. Sovjettsamveldið - saman við sínum sameindu - tók skjótt samsvarandi stig. Heimurin varð býttur sundur í vesturblokk og eysturblokk. Vesturblokkurin var allatíðina nógv sterkari fíggjarliga og hernaðarliga enn eysturblokkurin, men í oktober 1957 sendi Sovjettsamveldið fyrsta sputnikkin út í rúmdina. Fólk og myndugleikar vestanfyri undraðust á sovjettiska framtakið, men fingu ein álvarsligan hvøkk, nú sovjettiskar rakettir við kjarnorkuløðingum kundu røkka Vesturheimin allastaðni. Hetta skundaði enn meira undir tað annars støðugt høgu vápnadubbingina.

NATO setti enn meira ferð á hernaðarútbyggingina av verjuskipanum sum t.d. Early Warning (DEW) radarskipanini, ið rakk frá Kanada um Grønland, Ísland og Føroyar til Skotlands. Skipanin var fremst av øllum ætlað at byrgja sovjettisku hermegina inni í Norðuratlantshavi. Eisini nýggjar álopsskipanir vórðu skundaðir ígjøgnum. T.d. var Loran C skipanin ætlað at hjálpa polariskavbátunum, ið vóru útgjørdir við kjarnorku løddum rakettum, um hesir skuldu senda rakettir móti Sovjettsamveldinum. Svartabók (1999) sigur, at løgmaður gav í 1955 NATO loyvi at nýta Skálafjørðin sum tiltaksflotahavn. Eisini vísir Svartabók á, at løgmenn og/ella landstýri vistu um flestu hermálsligar útbyggingar í Føroyum.

Kaldakríggið byrjaði í Evropa, men eftir at Kina í 1949 gjørdist kommunistiskt og Koreakríggið byrjaði í 1950, flutti kaldakríggið eisini til Asia. Skjótt var hjálandakríggið hjá Fraklandi í Indokina partur av kaldakrígnum.

Kaldakríggið var ikki beinleiðis kríggj millum høvuðsmaktirnar USA og Sovjett, men "kríggið" var politiskt, hugsjónarligt, búskaparligt og mentanarligt. Fólk og ríki vóru "tvingað" at taka støðu fyri ella ímóti báðum høvuðsveldunum. Góð dømi um hetta eru, at ringt var hjá neutralulondunum at fáa ljóð fyri sínum sjónarmiðum. Tey vóru tíðum illa sædd og løgd undir illgitingar av USA og Sovjett. Eisini var sera trupult hjá fólki í blokkaskipanunum at hava aðra áskoðan enn tær almennu. Hesar áskoðanir blivu, um tær komu fram, dømdar sum 5. kolonnuvirksemi. T.e. samfelagsfíggindaligt virksemi. Í Vesturheiminum blivu fólk við øðrvísi áskoðanum skýrd at vera kommunistar og í eysturblokkinum vórðu tey skýrd kapitalistar og imperialistar.

Í samband við at Nato varð stovnað, helt føroyski landstingsmaðurin, sambandsmaðurin Poul Niclasen, at málið eisini átti at verið lagt fyri løgtingið. Men forsætisráðharrin, Hans Hedtoft, helt ikki, at hetta var neyðugt. (Í samrøðu við

høvundarnar heystið 1997 segði Johan Djurhuus, táverandi skrivstovustjóri í landsstýrinum, at málið um NATO bleiv lagt fyri løgtingið).

Í juli 1951 lýsti landsstýrið í Dagblaðnum, at Torshavns Marinedistrikt (seinni Færøernes Kommando) bleiv sett á stovn. Fyrst 3. desember 1952 blivu Føroyar við kunngerð í Dimmalætting frá ríkisumboðnum limaðar inn í NATO. Frá 1956-1959 vóru loyniligar samráðingar millum landsstýrið øðrumegin og NATO og ríkismyndugleikarnar hinumegin. Í 1958 gav landsstýrið NATO loyvi at byggja á Sornfelli, afturfyri at NATO rindaði kostnaðin av Oyggjarvegnum. Sama ár vóru eisini samráðingar um at byggja Loran C støðina á Eiði.

25. apríl 1959 tók meiriluti á løgtingi byggingina av radarskipanini á Sornfelli og Loran C støðina á Eiði til eftirtektar.

**1950 - 1960**

## Politisk viðurskifti

1940 - 48 høvdu Føroyar havt landsumsiting undir bráðfeingisstýrisskipanini. Við heimastýrislógini í 1948 varð staðfest, at løgtingið og landsstýrið høvdu lóggávuvald og útinnandi vald. Danska ríkisvaldið sat tó enn við teimum avgerandi suverenitetsgevandi økjunum t.d. uttanríkis- og hernaðarmálum.

Ein alsamt vaksandi partur av umsitingini varð fluttur heim úr Keypmannhavn. Hetta hevði við sær, at Tórshavn so við og við mentist sum høvuðsstaður í Føroyum. Parturin av Føroyafólki, ið búði í Tórshavn, fór at stórvaksa.

Eftir løgtingsvalið í 1950 helt heimasstýrissamgongan ikki fram. Heimastýrið var komið í trygga legu, og búskaparmálini komu fram í fyrstu røð. Føroyskur politikkur fór sum fráleið at líkjast evropeiskum politikki nógv meir enn frammanundan. Høvuðsandsøgnin var millum høgra og vinstra. Løgtingsvalið í 1954 er gott dømi um hetta. Tjóðveldisflokkurin, ið hevði staðið á odda í stríðnum á arbeiðsmarknaðinum - fiskimannaverkføll vóru báði í 1953 og 1954, og Erlendur Patursson var báði formaður í Tjóðveldisflokkinum og í Fiskimannafelagnum - gekk fram frá 2 til 6 tinglimir.

Tó at stríðið millum høgra og vinstra nú var avgerandi stríðsásurin í føroyskum politikki, kom tað óvart á tey flestu, at Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin skuldu skipa samgongu longu í 1950. Henda høgrasamgonga heldur fram eisini eftir valið í 1954, men tá við hjálp frá Sjálvstýrisflokkinum. Valskeiðini bæði gjørdust sera baldrut. Sjóvinnubankin fór tvær ferðir á heysin. Fleiri stórverkføll vóru báði á sjógvi og á landi og fakfelagsstríðið á arbeiðsmarknaðinum herdist.

Eisini er at nevna læknastríðið í Klaksvík, Klaksvíksstríðið. Stríðið galt hvørt Halvorsen, ið hevði havt samband við nasistarnar í Danmark undir krígnum, framhaldandi skuldi virka sum lækni í føstum starvi í Klaksvík. Hetta vildu flestu klaksvíksingar. Stríðið var sera harðligt, og 1. apríl 1955 samtykkir landsstýrissamgongan eina áheitan á ríkismyndugleikarnar um at fáa lóglig læknaviðurskifti í Klaksvík. Óbeinleiðis verður ásannað, at landsstýrið hevur mist tamarhaldið á støðuni. Í tveimum umførum í 1955 komu politihermenn til Klaksvíkar at halda skil á. Tá stríðið var lokið, fingu fleiri klaksvíksingar fingu harðar fongsulsrevsingar og bøtur.

Tíðirnar batnaðu seinnu helvt av fimtiárunum og onnur mál komu í fyrstu røð. Á løgtingsvalinum í 1958 vóru høvuðsmálini fólkapensjón og fiskimarksútflytan. Javnaðarflokkurin gekk fram frá 5 til 8 tinglimir, og Tjóðveldisflokkurin fekk ein afturat. Fyri fyrstu og enn einastu ferð fekk vinstravongurin á løgtingi helmingin av tingsessunum. Eftir valið varð tó vent aftur til traditionellu heimastýrissamgonguna.

**1950 - 1960**

## Búskaparlig viðurskifti

Árini undir krígnum og beint eftir gekk fram á búskaparliga í Føroyum. Fiskaprísirnir vóru høgir, og føroyingar vóru kappingarførir. Tær 62,5 milliónirnar (tá einar ellivu og ein hálv fíggjarlóg), ið høvdu staðið bundnar í Bretlandi, blivu nú brúktar, serliga til skip.

Men eftir 1948 gekk ikki longur framá. Fiskaprísirnir hækkaðu ikki meir, men tað gjørdu útreiðslurnar, serliga aftaná at Koreakríggið var brostið á í 1950. Støðan í heiminum var spent, og prísirnir á rávørum og ídnaðarvørum hækkaðu munandi. Hetta kom illa við hjá føroyingum. Nógv av skipunum vóru gomul og í vánaligum standi. Tey vóru báði dýr at reka og at halda, samstundis sum tey ikki stóðu seg í kappingini um fiskin, tí at kappingarneytarnir høvdu fingið sær nýggj og betri skip. Annar trupulleiki var, at nógv reiðarí vóru "bygdareiðarí", soleiðis at skilja, at ætlanin var í fyrsta lagi at tryggja bygdini arbeiðspláss og gott umdømi. Hesi reiðarí høvdu ongar royndir í at reka skip og ei heldur kapital at standa í móti við, og tey allarflestu fóru av knóranum eftir heilt stuttari tíð.

Sjóvinnnubankin fíggjaði meginpartin av fiskivinnuni. Tað var tí eyðsæð, at tá stórur partur av fiskiflotanum og fleiri stórvirki fóru heysin, rakti tað eisini bankan. Haraftur at hevði bankin rikið ein heldur kreativan útlánspolitikk. Bankin hevði gjørt lítið burtur úr at kanna hvørjum standi skip vóru í, ella hvørjar royndir ymsu reiðaríini høvdu. Ringast av øllum var, at báði stjóri og nevndarlimir - serliga nevndarformaðurin - vóru ánarar, stjórar og nevndarlimir í teimum somu virkjum, ið teir sjálvir høvdu latið størstu og mest váðafúsu útlánini. Tað eru hesi váðafúsu útlán, ið fyrst av øllum tvær ferðir koyra bankan á húsagang í 1951 og 1952. Aftan á húsagangin tóku løgtingið og forsætismálaráláráðið stig til at kanna Sjóvinnubankaraksturin. Tá fingu ábyrgdarhavarnir fongsulsrevsingar og bøtur.

Sjóvinnubankin bleiv endurreistur við milliónа stórum lánum og innskotum. Meginparturin vóru landskassaveðhildin ríkislán. Marshallhálpin var tó mest avgerandi fyri endureisnini av føroyska búskapinum. Av teimum 1,2 milliardum, sum Danmark fekk í Marshallhjálp fingu Føroyar 10 milliónir. Hesar fóru í fyrsta lagi til Realkreditstovnin at fíggja nýggjan veiðiflota, Skipafelagið Føroyar, Hvalastøðina við Áir, og ikki minst til SEV, ið fór undir stóru vatnorkuútbyggingarnar í Vestmanna. Umframt hetta var stóra sildaveiðan á Norðhavinum við at venda búskapargongdini.

**1950 - 1960**

## Sosial viðurskifti

Almenn forsorg, serforsorg, fólkatrygging og vanlukkutrygging vórðu yvirtikin av heimastýrinum beinanvegin í 1948. Nú á døgum fer sosiallóggávan við umleið triðinginum av fíggjarlógini. Men tá fóru bara umleið 1/7-partur til hetta sama.

Føroyska samfelagið var meginpartin av fimtiárunum í álvarsligari kreppu. Tá stórur partur av fiskiflotanum og vinnuvirkjunum á landi fóru á heysin, rendi tað fleiri 1000 fólk út í arbeiðsloysi. Arbeiðsloysisstuðul var ongin, so fólk máttu klára seg sum frægast. Neyðin var stór. Nógv fólk fluttu burtur at arbeiða, serliga til Danmarkar, Íslands og Noregs. Nógv av teimum, sum fóru til Danmarkar, tóku familjuna við, flestu teirra komu ongantíð aftur.

Seinast í fimtiárunum fór aftur at ganga framá. Hetta hevði eisini við sær hugburðabroytingar hjá vanliga føroyinginum. Arbeiðarafeløgini og annars fólk flest fóru at seta samfelagnum krøv. Tey vóru nú ikki nøgd einans við at *yvirliva*, tey vildu *liva*. Krøv um hægri livifót og sosiala trygd fingu vaksandi undirtøku. Verkføll vóru fyri at fáa hægri løn. Fólkapensjón, avlamispensjón o.a. sosialar skipanir vórðu settar í gildi.

Ein orsøk til hesa broyting í hugburði til livifót var, at tíðliga í fimtiárunum hendi tað, at fyri fyrstu ferð í Føroya søgu kostaðu matvørurnar hjá einum meðal húsarhaldi í Føroyum meira enn allar aðrar vørur til samans. Soleiðis at skilja, at minni enn 50% av húsarhaldskostnaðinum vóru matvørur og meiri enn 50% fóru nú til býli, klæðir o.t..

Vert er at geva gætur, at kaldakríggið hevði ávirkan á sosial viðurskifti í Føroyum. Stutt eftir at klaksvíksstríðið var av, mælti USA Danmark til at fáa framt sosialar batar í Føroyum. USA tulkaði klaksvíksstríðið ikki bara sum læknastríð, men sum úrslit av sosialum ójavna í Klaksvík og vánaligum sosialum umstøðum hjá fólki í Føroyum yvirhøvur.

**1950 - 1960**

## Mentanarlig viðurskifti

Kaldakríggið ávirkaði føroyskar bókmentir í fimtiárunum. Í 1930 og 1940-árunum var skaldskapurin týðiliga merktur av sosialrealistiska rákinum. Undir kaldakrígnum bar ikki til, ella tað var ikki loyvt at viðgera samfelagsligar spurningar ov ítøkiliga. Tí gekk rákið móti sosialpsykologiskari skriving. Høvundarnir vendu sær inneftir at viðgera sálarliga treytaðar spurningar. T.d. Karsten Hoydal, Jens Pauli Heinesen, William Heinesen og ikki minst Regin Dahl.

Alt, ið nært við viðurskiftini í kaldakrígnum var eldfimt. T.d. at ferðast eystanfyri og bera fram positivar upplýsingar í ferðafrásøgn aftaná, bleiv m.a. í Dagblaðnum mett sum sera óføroyskur atburður

Í fimtiárunum harðnar gamla stríðið um stavsetingina. Endin var, at løgtingið í 1954 samtykti fastar stavsetingarreglur í føroyskum.

Í 1957 byrjar føroyska útvarpið. Tað varð beinanvegin fólkaogn og fekk sambindandi leiklut hjá øllum føroyingum. Nú høvdu allir føroyingar nakrar felagsinformatiónir. Eisini setti tað ferð á føroyskt tónleikalív. Sangir sum "Eitt sunnukvøld í plantaguni.." og "Hvønn ein mánadag.." komu út á plátu, blivu evergreen í útvarpi og føroysk fólkaogn.

Í 1950-árunum vaksa føroysku fríkirkjurnar og gerast upp á seg nógv størri í Føroyum enn í hinum Norðurlondunum. Brøðrasamkoman veksur serliga nógv. Brøðurnir løgdu stóran dent á at bera átrúnaðin fram á føroyskum, m.a. við týðing av Bíbliuni umframt sangbók við fleiri enn 1000 føroyskum sangum.

**1960 - 1970**

## Altjóða viðurskifti

Eyðkennandi fyri 1960ini er m.a. avkoloniseringin av 3. heiminum. Í 1968 eru at kalla øll hjálondini hjá Bretlandi leys og sjálvstøðug. Kanska kendi Danmark seg trýst av hesi gongd og royndi tí at útbyggja og integrera Føroyar og Grønland til tess at varðveita ræðið yvir hesum londum. Sigast skal, at Danmark í Natohøpi hevði fíggjarligan fyrimun av Føroyum (lægri Natogjald).

Stórveldini USA og Sovjetsamveldið royndu hvør í sínum lagi at stuðla ymsum uppreistrarpørtum í gomlu hjálondunum. Tey royndu at styrkja teirra altjóðapolitisku og strategisku støðu. Tey høvdu í kalda krígnum dubbað seg við alskins kjarnorkuvápnum, sum kundu leggja heimin í oyði fleiri ferðir eftir stuttari løtu. Í Kubakreppuni í 1962 mundi enda galið. Eisini í Føroyum vóru fólk bangin og summi vóru fullkomiliga frá sær sjálvum av ræðslu. Tey tordu ikki at lurta eftir útvarpinum og fóru burtur í haga at reika.

Eftir Kubakreppuna tyktist vandin fyri beinleiðis stórveldakríggi at vera avhæsaður. Men hóast nakað linkað helt kalda kríggið fram.

Í 1960 unum íbirtist ein rørsla, millum lesandi serliga, í Japan og USA. Rørslan vendi sær ímóti tí autoritera statinum og myndugleikaveldi yvirhøvur. Rørslan vildi vinna fólki størri frælsi til at gera tað, tey høvdu hug til: frælsi at ráða sær sjálvum. Eisini skundaði vietnamkríggið undir uppreisturin, tí her stríddist Dávid ímóti Goliati.

Tá t.d. foreldrini vildu hava børnini á lærdan háskúla at lesa jura, fyri at koma sær fram í samfelagnum, vildi nýggi ungdómurin heldur hava loyvi at fara út á gøturnar at syngja Bob Dylan og at ganga mótmælisgongur ímóti vietnamkrígnum og syngja t.d.

> Hey, hey LBJ
> how many kids
> have you killed today?

Rørslan breiddi seg skjótt til Vesturheimin og fekk navnið "ungdómsuppreisturin".

Hetta er væl í tráð við tvær hugburðakanningar millum ungdómar 15 - 29 ár í Fraklandi. Fyrra kanningin var í 1957. Ungdómarnir blivu spurdir, um teir fóru at ganga í fótasporum foreldranna. 76% svaraðu ja og 16% svaraðu nei. Seinna kanningin var í 1968. Tá svaraðu 92% nei og 5% ja.

**1960 - 1970**

## Politisk viðurskifti

Føroyskur politikkur í 1960-árunum var heilt ólíkur politikkinum í 1950-árunum, tá ringarnir frá kaldakrígnum og sosial neyð í Føroyum settu politisku flokkarnar hugsjónarliga hvassliga upp í móti hvør øðrum. Eisini eru 1960-árini merkt av javnari og áhaldandi samfelagsmenning við stórvøkstri í útflutningi og donskum ríkisstuðli, sum í ávísan mun doyvir stríðið millum politisku flokkarnar um at býta samfelagskøkuna og at stríðast um loysing og samband.

Eftir valið í 1962 bendi alt á, at samgonga varð skipað millum javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin. Teir høvdu skrivað samgonguskjalið, men tá á stóð, bar ikki til. Úrslitið gjørdist, at "Sjálvstýrislandsstýrið" bleiv skipað, men hóast rættiliga víðgongdan sjálvstýrisretorikk, hendi at kalla onki í so máta. Serliga løgið var, at landsstýrið onga yvirtøku framdi. Petur Martin Rasmussen og Hanus A. Samuelsen siga í "Føroya søgu" (1965) orsøkina vera ósemju um, hvørt fíggjarligt grundarlag var fyri yvirtøkum ella ikki.

Eftir valið í 1966 var sera ringt at skipa landsstýri, og tað mundi enda við nývali. Úrslitið av hesum var áður roynda samgongan millum heimastýrisflokkarnar.

Í 1959 var fiskimarkið flutt út á 12 fjórðingar, men markið var ikki sett út frá beinum grundlinjum. Bretar fingu sersáttmála at fiska inn at 6 fjórðingum. Sáttmálin var galdandi í 3 ár og kundi tá sigast upp við eitt ára freist. Hóast bretar mótmæltu og hóttu við tiltøkum móti føroyingum, stóðu føroyingar fast, og í 1964 varð fiskimarkið flutt út á 12 fjórðingar úr beinum grundlinjum. Bretar vóru í øðini og settu kvotu á føroyskar ísfiskalandingar í Bretlandi.

Fyri lesandi ungdómar hevur føroyskur politikkur í 1960- árunum helst ikki verið serliga áhugaverdur. Í januar í 1970 skrivar Hans Jacob Debes grein í Oyggjaskeggja, sum hann nevnir "Føroyskur politikkur". Hann sigur m.a.: "Føroyskur politikkur í 60-unum lýsir seg best sjálvur. Les og kanna tey føroysku bløðini. Hvussu nógv er har av tí, teir aðrastaðni rópa "politikk"? Hoyr ein tingfund - serliga ein útvarpaðan. Hvat er her av politiskum hugsjónum, av miðvísum samfelagstonkum? Hvat hoyrist har um spurningur, sum heimurin dunar av? Tú situr eftir við einari mynd: av persónligum brigsli, av møsni, av heimføðisskapi, av hugsjónarloysi, av ætlanarloysi og av løtupolitikki. Tú fyllist av mótloysi og biður alt gott standa hjá tær. Tað er skilligt, hví virðingin millum fólk fyri politikki og politikkarum er so lítil, og hví apolitiseringin nørist".

**1960 - 1970**

## Búskaparlig viðurskifti

Búskaparliga gongdin í Føroyum í 60unum var eyðkend við búskaparvøkstri og, sum fyrr nevnt, vøkstri í ríkisstuðlinum til Føroya. Íblásturin til hesa búskaparligu framgongd kom í stóran mun av Marshallhjálpini, sum var ein høvuðsfaktorur í búskaparframgongdini í Vesturevropa yvirhøvur í 50 - og 60 árunum.

Í 1960 árunum blivu sluppirnar og skonnartirnar skiftar út við nýmótans stáltrolarar og stállínuskip. Við hesum var grundarlag lagt fyri kappingarførum heilársfiskiskapi. Størstu íløgurnar blivu gjørdar í stállínuskip, ið fyri tað mesta fiskaðu undir Grønlandi. Eisini vóru stórar íløgur gjørdar í trolarar og verksmiðjutrolarar. Sildaveiðan, ið hevði ment seg nógv í 1950 árunum, stórvaks í 1960 árunum. Við kraftblokkaskipunum hendi tøknilig kollvelting í sildafiskiskapinum, ið 6 faldaðist frá 1963 til 1967. Á landi vóru bygdar fleiri sildaverksmiðjur til framleiðslu av sildamjøli og sildalýsi. Men nú hevði tøknin og grammheitin vunnið á náttúruni. Í 1970 var sildin uppfiskað.

Tá fiskimarkið í 1964 varð flutt út á 12 fjórðingar, minkaðu sum fyrr nevnt veiðimøguleikarnir hjá bretum undir Føroyum. Bretar ásettu aftur ímóti ísfiskakvotu fyri føroysk skip á bretska marknaðinum og noyddu harvið føroyingar at útbyggja verandi fiskavirki og byggja fleiri nýggj flakavirki umframt at finna nýggjar útflutningsmarknaðir. Útflytingin av fiskimarkinum og at orkutrupulleikarnir á landi vóru loystir, økti munandi um útróðrarvinnuna í Føroyum, samstundis sum nógv nýggj arbeiðspláss vórðu stovnað á landi. Í tíðarskeiðinum 1960 - 1969 øktist virðið í fiskaútflutningi Føroya við góðum 100%.

Í Danmark byrjaði vælferðarsamfelagið umleið 1960. Har var eisini tann politiska áskoðanin galdandi, at útjaðaraøkini í danska ríkinum skuldu fáa ágóða av hesi vælferð. Hesum vóru allir løgmenn og samgongur í Føroyum í 60 unum samd í. Í tíðarskeiðinum 1960 - 1969 øktist danski ríkisstuðulin til Føroya við 394%. Og í 1965/66 bar ríkisstuðulin uml. 45% av rakstrar - og íløguútreiðslunum hjá tí almenna í Føroyum.

**1960 - 1970**

## Sosial viðurskifti

1960-árini eru eyðkend av framgongd og livifóturin hækkar í stórum. Frá 1958 til 1973 umleið tvífaldaðist realønin hjá tímaløntum arbeiðsmanni.

Hetta er tíðin, tá konufólk fara at seta krøv um betri tilveru. Enn krevja tær tó ikki beinleiðis samfelagsbroytingar og politiskt vald. Kvinnurnar koma í nógv størri mun út á arbeiðsmarknaðin. Á bygd fara tær at arbeiða á nógvu nýggju flakavirkjunum og í Havn í tí almenna.

Tað almenna fer at vaksa sera skjótt so hvørt sum heilsuverk, skúlaverk, mentaverk og almannaverk verður útbygt. Bygd verða t.d. Landssjúkrahús, Læraraskúli, Studentaskúli í Hoydølum, Fróðskaparsetur, Listaskáli, Kristianskirkja í Klaksvík, Klaksvíkar sjúkrahús veksur o. m. a.

At konufólk fara út á arbeiðsmarknaðin og at fiskiskapur var vorðin heilársyrki setir av álvara ferð á flytingina av bygd og í bý. Útjaðarabygdirnar fara at minka, meðan Havnin stórveksur.

Gamla bygdamyndin við kúgv í nógvum húsum hvørvur, og føroyska húsarhaldið verður útgjørt við alskyns hentleikum. T.d. toiletti, miðstøðuhita, køksbúnyttum og frystiboks.

Hóast framgongd, var ikki pláss fyri øllum. Ungfólk í stórum tali fluttu av landinum, nærum øll til Danmarkar. Hetta hevði øgiliga stóra ávirkan á føroyska samfelagið. Serliga tí at helmingurin av teimum, ið fluttu, vóru gentur í aldrinum 15-19 ár. Tá so bara fáar av hesum gentum fluttu heimaftur, bar tað við sær, at í 1966 vóru 10 % fleiri mannfólk enn konufólk í Føroyum. Orsakirnar til hetta skeiva kynsbýti vóru mangar. Tænastuvinnurnar, har nógv konufólk arbeiða, vóru enn lítið útbygdar. Sosialar veitingar vóru lágar, serliga til einligar mammur, eins og sterku moralsku fordómarnir um, at konufólk ikki kundu ráða sær sjálvum, stygdu tær av landinum.

**1960 - 1970**

## Mentanarlig viðurskifti

Føroyskt mentanarlív tók seg væl fram í 1960-árunum. Alt síðan tjóðskaparrørslan seinast í 19. øld kom í og fór at seta sær mál og skipa fyri framtøkum, hevði menning verið á økinum. Men eftir 1948 bar tað føroyingum til sjálvir at játta pengar til mentavirksemi.

Útvarpið var farið at senda í 1957 og bleiv skjótt fastur táttur í føroyskum mentanarlívi. Tá útvarpið sendi tíðindi á miðdegi sat føroyska familjan til borðs og át døgurða, og ongin mátti tala orð. Soleiðis vaks rættiliga skjótt fram ein "samleiki" úr felags kunningarstøðinum.

Føroysk málningalist mentist. Betraðu listarligu umstøðurnar gjørdu, at fleiri hættaðu sær undir hesa list. Eins og ávirkanin og virðingin fyri stóra málaranum Mikines minkaðu um fordómarnar fyri at velja sær hetta yrki. Sum tekin um at list var góðkend av myndugleikunum, varð Listinskáli bygdur í Havn í 60 árunum.

Í 1965 byrjaði Føroya Fróðskaparsetur. Í fyrstani var einans undirvísing í føroyskum, men endamálið var at útbyggja tað til eitt veruligt Fróðskaparsetur.

Skaldskapur á føroyskum gjørdist alsamt vanligari. Prosa- og lýriskur skaldskapur varð skrivaður og útgivin. Nýggj bókmentarák taka seg fram t.d. modernisma og nýrealisma. Samstundis gjørdist vanligari at viðgera altjóða viðurskifti í føroyskum bókmentum. T.d. kjarnorkuvápna vandan, ungdómsuppreisturin og Vjetmankríggið. Eisini komu mánaðarbløð og tíðarrit út. Hetta samstundis sum at flestu politiskir flokkar høvdu egið floksblað. Í Keypmannahavn góvu føroyingar út bløðini Oyggjaframi, Oyggjaskeggi og tíðarritið Fjølnir

Eisini kirkjan mentist og fekk størri sjálvræði. Í 1963 var føroyska kirkjan skipað sum varabiskupadømi. Tá hevði hon verið próstadømi í 400 ár.

Tónleikalívið í Føroyum blómaði í seksti árunum. Orkestur spruttu fram í flestu bygdum og hesi løgdu seg í stóran mun eftir bretska og amerikanska rokktónleikinum. Men t. d.vælumtóktu orkestrini Faroe Boys og Tey á kamarinum góvu út sangir við føroyskum teksti.

**1970 - 1980**

## Altjóða viðurskifti

Eitt høvuðseyðkenni fyri 1970 árini er, at USA í stóran mun missir sína avgjørdu leiðslu á altjóða leikpallinum bæði politiskt, búskaparliga og kanska serliga sálarliga. Í 1975 taka kommunistarnir valdið í Suðurvjetnam, samstundis sum Reyðu Khmerarnir fáa valdið í Kambodia. USA er eyðmýkt fyri øllum heiminum, og amerikanar vita hetta. Allur Asia-politikkurin hjá USA var miseydnaður. USA hevði mett, at um eitt land bleiv kommunistiskt, gjørdust øll grannalondini tað eisini, og at kommunistisku londini vóru einans blokkur. Hesin politikkur, sum var grundaður á Domino-teoriina, varð endaliga mótprógvaður seinast í 1970-árunum, tá Vjetnam var í kríggj við bæði Kambodia og Kina. Um somu tíð var USA rakt av ógvisligari gølu, Watergate. Menn úr republikanska flokkinum høvdu upp undir forsetavalið í 1972 brotið inn á skrivstovurnar hjá demokratiska flokkinum fyri at stjala skjøl. Hesi vórðu avdúkað og skjótt kom fram, at sjálvur forsetin, Richard Nixon, stóð aftanfyri hetta. Nixon og varaforsetin S. Agnew vórðu noyddir at leggja frá sær. Nýggjur forseti varð Gerald Ford, ið er einasti higartil ikki valdi forseti í USA. USA ók sálarliga og moralskt á knøunum.

Í 1975 fingu seinastu stóru hjálondini loysing, tá einaveldið í Portugal fall. Tey eru Mosambik, Angola og Guinea Bissau í Afrika umframt Eysturtimor í Asia. Fyri at bjarga tí, ið bjargast kundi, stuðlaði USA innrásina hjá Indonesia í Eysturtimor. Í nógvum av nýggju sjálvstøðugu ríkjunum í Afrika brast borgarakríggj á, ófriður og afturvendandi ríkiskvett. Allar hesar ósemjur verða beinanvegin drignar inn í Kaldakríggið, soleiðis at USA og Sovjettsamveldið halda við og stuðla hvør sínum parti í hesum ósemjum.

Tíðliga í 1970-árunum vóru USA og Kina farin at nærkast hvørjum øðrum, m.a. fekk Kina sess í ST í 1971. Sovjettsamveldið er mitt í Bresjnevtíðini. Men hetta er eisini tíðin, tá ið Sovjettsamveldið fer at støgða upp. Tað hendu ongar rationaliseringar í ídnaðinum. Verksmiðjur vóru enn gjørdar eftir leistinum frá 1930-árunum, og einasti mátin at økja framleiðsluna var at nýta meiri arbeiðsmegi. Aftan á at USA, sum nevnt, hevði mist sín avgjørda leiðarasess í heiminum, fekk Sovjettsamveldið meir goodwill sum antiimperialistiskt veldi og kom meir fram á altjóða leikpallin. Sovjettiska innrásin í Afganistan í 1979 hevði við sær, at Sovjett aftur misti sítt anti-imperialistiska andlit í 3. heiminum.

Í 1970- árunum vóru nógvar maktyvirtøkur og maktskifti. Samanborið við, hvat vanligt var áður, eru hesi skifti ógvislig og kostaðu nógv mannalív.

Tvær hendingar í Miðeystri fáa alstóran politiskan og búskaparligan týdning í 1970-árunum. Tann fyrra er Oktoberkríggið í 1973 millum Ísrael og arabaralondini. Seinna hendingin var, tá USA-sinnaða Shahstýrið í Iran fall í islamisku kollveltingini hjá Khomeiny. Báðar hendingar førdu til sera miklan prísvøkstur á olju.

**1970 - 1980**

## Politisk viðurskifti

Løgtingsvalið í 1970 gav onga broyting í tingmannabýtinum millum andstøðu og samgongu, og verandi samgonga, heimastýrissamgongan, helt fram.

Serliga eitt mál kom at seta dám á orðaskiftið hetta valskeiðið. Í 1970 fóru Danmark, Bretland, Írland og Noreg undir samráðingar við Evropeiska Felagsskapin (EF) um limskap. Í Føroyum kom beinanvegin lívligt kjak í um, hvørt Føroyar skuldu fylgja Danmark eftir og gerast limur í felagsskapinum. Málið var fyrst avgreitt, tá ið eitt samt løgting í 1974 avgjørdi, at Føroyar skuldu standa uttanfyri, hóast Danmark var farið inn í EF. Mett var, "at føroysk luttøka í EF undir verandi treytum, serliga hvat fiskirættindunum viðvíkur, ikki er ráðilig."

Í 1975 var nýggj og áður óroynd samgonga skipað millum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin. Samgongan setti sær fyri at reka ein ekspansivan politikk. Hetta hevði við sær, at fleiri A-mál í heimastýrislógini vórðu yvirtikin eftir grein 9. M.a. postmál, skúlamál og partur av almanna- og heilsumálum. Hetta hevði eisini við sær hugburðabroyting hjá landsins politisku leiðslu. Landsstýrið varð nú nógv størsti arbeiðsgevari í Føroyum.

Í 1973 trífaldaðust prísirnir á olju. Oljan hevði áður verið sera bílig, og ongin hevði hugsað um at spara, hvørki í privatnýtslu ella vinnulívi. Føroyska samfelagið nýtir sera nógva olju, bæði til húsarhaldini og serliga til skipini. Og tí rakti dýrkandi oljan Føroyar serliga meint. Tá fiskaprísirnir fyrra hálvár 1975 harafturat fóru at falla, gjørdist álvarslig kreppa í fiskivinnuni. Í mei/juni 1975 fór útróðrarflotin í "verkfall" (landingarbann). Størru útróðrarbátarnir stevndu til Havnar, og havnin í Havn varð stongd í einar tíggju dagar.

Loysnin uppá kreppuna var Ráfiskagrunnurin. Grunnurin skuldi stuðla rakstrinum av fiskivinnuni. Tá ið prísirnir vóru lágir skuldi grunnurin geva prísískoyti fyri hvørt kilo av fiski. Fekk ávíst fiskaslag høgan prís, skuldi tað lata eitt sindur inn í grunnin. Ætlanin var, at søluliðið skuldi taka sær av hesum, men Fiskasølan noktaði at vera við í skipanin. Tí kom landskassin at standa við endan. Við hesum vóru allar vanligar marknaðarkreftir í fiskivinnuni settar til viks.

Í 1976 var stórur mótmælisfundur móti NATO-støðini í Mjørkadali. Orsøkin var, at ein ávísur "major Jensen" í samrøðu við myndablaðið Magn, hevði sagt frá, at ein høvuðsuppgávan hjá støðini var at niðurberja eina møguliga 5. kolonnu í Føroyum, og at støðin so avgjørt var álopsmál. Meginparturin av fundarluttakarunum vóru fólk, ið frammanundan vóru vorðin politisk virkin í EF-málinum.

**1970 - 1980**

## Búskaparlig viðurskifti

Árini 1970-73 eru helst bestu ár hjá føroyska búskapinum í tíðini eftir kríggið higartil. Tá er sera stórur vøkstur í útflutningi umframt avlop á gjaldsjavnanum. Men sum áður nevnt kemur fyrra oljukreppan í 1973. Í 1979 aftur ein oljukreppa. Hesar oljukreppur broyta býtislutfallið millum innfluttar og útfluttar vørur munandi.

Samstundis sum oljukreppurnar raka føroyska búskapin, flyta londini í Norðuratlantshavi sjómørkini út á 200 fjórðingar. Tað gera føroyingar eisini í 1977. Stórur partur av fjarflotanum kemur heim, men heimaleiðir vóru trongri enn fjarleiðir og góvu minni úrtøku. Eisini tyngdi tað skiparaksturin, at neyðugt var at umbyggja flotan til nýggju umstøðurnar.

Eitt afturvendandi fyribrigdi tykist vera, at tá ið at treingir við vinnurakstrinum, stinga seg upp nýggj hugskot og stór krøv um stórar íløgur á nýggjum ókendum økjum. Alsamt fleiri íløgur vórðu gjørdar, ið vóru størri enn Búskaparráðið hevði ætlað, og eyðsæð var, at nú byrjar ein íløguvøkstur, sum er ov vágin í mun til búskapin. At íløgur framvegis kundu gerast, hóast gjaldsjavnahall, kom millum annað av, at frá 1971 bar til at fáa uttanlandslán í fremmandum gjaldoyra á útlendska kapitalmarknaðinum. Landsstýrið royndi í ávísan mun at tálma hesum lánum og gjørdi munnliga avtalu við donsku kredittfeløgini, at lánini bara skuldu latast til stórar bygningar og ikki sethús. Men sum heild varð samfelagsraksturin hesi árini ikki tillagaður búskapin. Besta dømi um hetta er hátturin, Ráðfiskagrunnurin bleiv skipaður.

Nógvar íløgur vórðu gjørdar í privatu vinnuna hesi ár. Í 1972 kom lógin um at stovna kommanditfeløg. Hetta bar við sær stóran vøkstur í íløguhuginum, av tí at hesin íløguháttur gav kommandittunum stórar skattligar fyrimunir. Íløgur vórðu gjørdar í rækjuskip, ídnaðarskip, nótaskip, djúpvatnstrolarar, stórar útróðrarbátar og flakavirki. Eisini vaksa íløgurnar á landi munandi m.a. varð SMS í Havn bygt.

Framdar verða stórar íløgur á almenna økinum. Samskiftiskervið verður betrað. Tunlar, vegir og havnir verða gjørd. Tað er stórhending, at brúgv verður gjørd um Streymin, sum bindur saman tær báðar størstu oyggjarnar í Føroyum. Høvuðshugsjónin aftanfyri útbyggingina av bæði samferðslu og eisini flakvirkjum, var hugsanin um "bygdamenning", ið fyrstu ferð sá dagsins ljós í samgonguskjalinum í 1975. Strandferðslan keypir størri bilferju (Smyril) til suðuroyarsiglingina. Um summarið er Smyril í sigling til Skotlands, Noregs, Danmarkar og Íslands.

**1970 - 1980**

## Sosial viðurskifti

Tá ið fyrra oljukreppan kom í 1973 vóru Føroyar vorðnar eitt vælferðarsamfelag. Livifóturin hjá vanliga føroyska løntakaranum var komin nøkunlunda ájavnt við tann í Skandinavisku grannalondunum, og bjartskygnið var stórt.

Sum heild var sera stór inflasjón í Føroyum í 1970-árunum. Í 1975 setur samgongan fram uppskot um at nullstillað prístalið, ella seta tað úr 941 í 100. Prístalið var soleiðis hóttað, at fyri hvørji 3 stig tað hækkaði, útloystist ein prísviðbót. Um prístalið hækkaði úr 100 upp í 103 stig, hækkaði tað 3% og útloysti eina prísviðbót. Hækkaði prístalið hinvegin úr 900 upp í 909 stig, hækkað tað 1%, men útloysti kortini tríggjar prísviðbøtur. Skilligt var, at løntakarnir vóru í móti at broyta skipanina, meðan arbeiðsgevararnir vildu vera fyri. Aftur í 1980 og 1983 varð prístalið nullstillað. Í 1990 varð tað tikið heilt av.

Sum avleiðing av ungdómsuppreistrinum kom kvinnustríðið til Føroya. Ein høvuðsspurningur var líkaløn fyri líkaarbeiði. Í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag frá 1977 stóð m.a., at frá 1. mei 1981 at rokna skuldi kvinnur og menn fáa líka løn fyri sama arbeiði. Kvinnurnar stríddust eisini móti moralskum fordómum, sum at kvinnur ikki kundu gera tað sama, sum menn gjørdu. Tær vildu ráða sær sjálvari, antin tær vóru giftar ella ei. Tær stovnaðu kvinnufelagsskapir og bólkar at arbeiða fyri síni søk.

Í hundrað ár høvdu føroyingar útflutt síni brekaðu og menningartarnaðu til Danmarkar. Men í 1970-árunum kemur hugburðabroyting í Føroyum. Í 1971 varð felagið Javni stovnað at taka sær av áhugamálum hjá brekaðum og teirra avvarandi. Tvey ár seinni koma tey fyrstu menningartarnaðu heimaftur, og í 1980 eru tey flestu heima aftur.

At fáa rætt til pengar undir sjúku, dagpengaskipan, hevði leingi verið krav frá fakfelagsrørsluni. Kravið var, at landið og arbeiðsgevararnir skuldu í felag gjalda skipanina. Men tá ið skipanin var samtykt á løgtingi, sluppu arbeiðsgevararnir heilt undan at gjalda, og landið kom at gjalda alla skipanina.

**1970 - 1980**

## Mentanarlig viðurskifti

Føroyskt mentanarlív mennist almikið í 1970-árunum. T.d. koma í 1971 ikki færri enn 45 bøkur út á føroyskum, og í 1977 byrjar hitt sera virkna plátufelagið Tutl.

Vanligt hevði verið at tala danskt til studentspróvtøkuna, um próvdómarin ikki skilti føroyskt. Í 1974 kravdu næmingarnir í Hoydølum at sleppa at tala føroyskt til próvtøkuna. Hetta bar til í øllum lærugreinum uttan til munnligu royndina í samfelagslæru. Tveir næmingar tosaðu føroyskt og fingu tí ikki studentsprógv. Árið eftir vildu 12 næmingar í skrivligari lívfrøði ikki skriva á donskum ella ganga undir at lata próvtøkuuppgávuna týða til danskt, soleiðis at týðingin skuldi metast og fáa próvtal. Heldur ikki hesir næmingar fingu prógv.

Í 1975 byrjar hjágreinalestur í føroyskum á Fróðskaparsetri Føroya (exam. art.)

Hóast tað nú bar fram á fyri føroyskt, so varð tó nógv enn skrivað á donskum. T.d. var stórur partur av landsins størstu ávís, Dimmalætting, enn í 1975 skrivaður á donskum.

Nógv av teimum virknu skaldunum í 1970-árunum eru týðiliga ávirkað av eini vinstrahallari ella aðrari afturundirgerð. T.d. Hanus Andreassen, Alexandur Kristiansen og Jóanes Nielsen. Skøldini skriva um altjóðapolitikk, viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum og sosial sálarfrøðilig viðurskifti.

Føroyskt tónleikalív mentist eisini almikið hetta tíggjuáraskeið. Stórt tal av rokkbólkum kom fram í Føroyum. Hesir spældu til dans vikuskiftiskvøldini. Meginparturin av tí, ið var spælt, var enskur kærleikstónleikur. Men eisini samfelagsprovokerandi tónleikur varð spældur og útgivin á plátu, t.d. Harkaliðið og Kári p.

Ein tónleikalig afturundirgerð helt til niðri í gomlu matstovuni Perluni í Havn. Har varð mest jassur spældur. Hesin jassur kom Perluni í ringt orð, og kanska var tað orsøkin til, at býráðið í Havn læt Perluna ríva niður.

Í 1970-árunum var Rúsdrekkasøla Landsins ikki til. Skuldi tú hava ein løgg, var neyðugt við skilagóðari tilrættislegging. Brennivínsnýtsla var eftir gomlu lógini strangt persónlig og bara fyri góðar samfelagsborgarar, ið ikki skyldaðu skatt. Eftirlitið við hesum var strangt, og tú vart sendur eina “sanna kanossagongd" runt tað nógva av almennum kontórum, áðrenn "lítlin" var fingin til høldar. Av tí at tað var trupult at fáa fatur í rúsdrekka og aldursmarkið var 20 - 21 ár, blómaði ein "svørt" rúsdrekkasøla í Føroyum.

**1980 - 1990**

## Altjóða viðurskifti

Tíðirnar vóru uppá tað besta miðskeiðis í 1970 árunum, men so vendi. Arbeiðsloysi tók at vaksa. Nú fekk nýliberalisma vind í seglini. Men eisini skaptust fortreytir fyri rasismu og nýnasismu.

Ronald Reagan og Margareth Thatcher koma til valdið í ávikavist USA(1981) og Bretlandi(1979). Í Bretlandi setir Thatcher ein umfatandi privatiseringspolitikk í verk til tess at fáa búskapin á føtur aftur. So við og við fingu stjórnirnar í vesturheiminum tamarhald á prísunum, men arbeiðsloysið var støðugt ella enntá vaks. Thatcher førdi ein harðan og eirindaleysan politikk ímóti fakfeløgunum t.d. hjá kolanámsarbeiðarunum.

Í USA fór Reagan somuleiðis harðliga fram mótvegis fakfeløgum. Í 1981 ynsktu flúgvileiðararnir á amerikansku flogvøllunum at fáa niðursettan pensjónsaldur og at fáa ávirkan á arbeiðstíðina. Reagan-stjórnin svaraði aftur við at koyra allar teir 12.000 flúgvileiðararnar til hús og út í arbeiðsloysi. Í staðin bleiv amerikanski herurin settur at taka sær av uppgávunum hjá flúgvileiðarunum. Fakfelagið varð síðani tikið av.

Í desembur 1979 ger sovjetiski herurin innrás í Afghanistan. Í 1982 hersetir Argentina Falklandsoyggjarnar, men Bretland rekur tað útaftur. Sama ár tekur USA Grenada. Hesar hendingar økja kaltkrígsspenningin ímillum USA og Sovjetsamveldið. Fyrra helvt av 80 unum er eisini eyðkend við kjarnorkuvápnakappdubbing millum USA/Nato og Sovjetsamveldið/Warsawasamgonguna. Í USA fór ein sokallað SDI gransking fram, sum hevði til endamáls at vita, hvussu amerikanarar við laserstrálum kundu verja seg móti sovjettiskum rakettum og stríðsvognum. Henda krígsætlanin kundi eisini fara fram úti í rúmdini og varð tí nevnd "stjørnukrígsætlanin". Seinni er komið fram, at einki veruligt innihald var í hesum. Ístaðin var ætlanin brúkt av Reagan stjórnini til at geva amerikanska vápnaídnaðinum ein fjaldan ríkisstuðul.

Nógv vóru tey, ið hildu kjarnorkuvápnadubbingina vera tann rami ørskapur, ið lættliga kundi føra til eitt altoyðandi heimskríggj. Nógv av hesum fólkum stovnaðu friðarrørslur, ið gingu kravgongur fyri avdubbing og friði. Hjá nøkrum friðarrørslum t.d. í Avstralia/New Zælandi var hetta at lýsa øki kjarnorkuvápnafrí ein máti at byrja avdubbingina.

Í Føroyum var síðani 1970 ini ein rørsla, ið nevndist "Fylkingin móti Nato", hvørs høvuðsendamál var at fáa Nato úr Føroyum og Føroyar úr Nato.

Í byrjanini av 1980 unum kom friðarrørslan "Fólk fyri friði", ið skipaði fyri friðargongum og friðarfundum. Annað endamál hjá friðarrørslunum var at fáa fólk at tala saman og harvið avdúka fíggindamyndirnar.

Í Føroyum vóru friðargongur ofta 2. hvítusunnudag. Gingið varð úr Mjørkadali eftir Oyggjarvegnum og til Havnar, har fundur varð settur á Tinghúsvøllinum. Ivaleyst hava hesi tiltøk medvirkað, at Føroya Løgting í 1984 samtykti at lýsa

Føroyar sum kjarnorkuvápnafrítt øki. Henda samtykt var eisini í tráð við fleiri løgtingssamtyktir frammanundan um at mæla ímóti hernaðarstøðunum í Føroyum. Samtyktin var ein stórhending í politiskari søgu í Føroyum.

Hetta árið, 1984, verður Reagan endurvaldur sum amerikanskur forseti og árið eftir verður ein higartil lítið kendur Mikhail Gorbatjov valdur til leiðara í Sovjettsamveldinum. Viðurskiftini millum USA og Sovjettsamveldið batnaðu, og so við og við í seinnu helvt av 80 unum gera Reagan (frá 1989 George Bush) og Gorbatjov eina røð av avtalum um at avdubba í Evropa.

Í august 1987 kom tað amerikanska herskipið Mc Cloy 1038 inn á Havnina. Stór mótmælisgonga tók ímóti herskipinum, tí tað møguliga hevði kjarnorkuvápn innanborða. Eisini kom mótmælisskriv frá løgmanni vísandi til løgtingssamtyktina um Føroyar sum atomvápnafrítt øki. Umframt mótmælisgonguna var eisini ein viðmælisgonga, sum við skeltum vísti á, at "Nato tryggjar friðin".

Í 1980 unum varð Evropa rakt av fleiri økologiskum vanlukkum. T.d. í apríl 1986, tá ein reaktorur í kjarnorkuverkinum í Tjernobyl í Sovjettsamveldinum/Ukraina sprongdist og geislavirkið avfall rakti stórar partar av Eystur - og Norðurevropa. Sovjettisku myndugleikarnir vóru sera seinir at boða umheiminum frá vanlukkuni. Í Finlandi og Svøríki hevði geislavirkna avfallið við sær, at vandi var báði fyri grønmetisskurðinum og tað at eta reinsdjórakjøt. Í Danmark varð forboð sett ímóti at lata neyt ganga á beiti.

Tá Gorbatjov bleiv floksleiðari í Sovjettsamveldinum í 1985 slepti hann partvíst búskaparligum og politiskum prinsippum, sum Sovjetsamveldið hevði bygt upp síðan 1930 ini. Loysunnarorð Gorbatjovs vóru glasnost, t.e. almenn hugsan og opinleiki, perestrojka t.e. broyting og endurnýggjan og demokratisering**.** Í 1989 hevði hesin politikkur við sær stórar broytingar ikki bert í Sovjettsamveldinum, men eisini um alt Eysturevropa. Múrurin í Berlin rapaði, Póland, Tjekkoslovakia, Ungarn, Bulgaria og Eysturtýskland avtóku kommunistisku stýrini og í Rumenia bleiv borgarakríggj.

Altjóða støðan við endan av 1980 árunum var sera ógreið og kaotisk.

**1980 - 1990**

## Politisk viðurskifti

Í 1980 slitnaði stóra samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkkin, hon hevði tá sitið í 6 ár. Slitið kom av ósemju millum Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin øðrumegin og Fólkaflokkin hinumegin, um Smyril hjá Strandfaraskipum Landsins skuldi vera í vetrarsigling millum Skotland og Føroya. Á valinum fekk Sjálvstýrisflokkurin ein løgtingslim afturat og Javnaðarflokkurin misti ein. Valið hevði verið eitt ideologiskt høgra-vinstra val, og úrslitið vísti á eina høgrasamgongu. Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin skipaðu samgongu. Løgmaður varð Pauli Ellefsen úr Sambandsflokkinum. Stutt eftir varð vetrarsiglingin hjá Smyrli støðgað. Samgongan setti gongd á íløgur í m.a. farmaskip. Hon setti eisini vatnorkuútbyggingina hjá SEV í verk á Eiði. Hetta valskeiðið trífaldaðist føroyska uttanlandsskuldin.

Á valinum í 1984 vann Javnaðarflokkurin 1 tinglim og bleiv aftur størstur flokkur. Eisini fólkaflokkuirn vann ein, meðan Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin mistu hvør sín. Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og nýstovnaði Kristiligi Fólkaflokkurin skipaðu samgongu. Samgongan setti sær fyri at fáa tamarhald á búskapinum, men hetta miseydnist, ístaðin kom enn meira ferð á búskapin. Uttanlandsskuldin nærum trífaldaðist enn einaferð hetta valskeiðið.

Á løgtingsvalinum í 1988 gjørdist Fólkaflokkurin størstur og skipaði samgongu við Tjóðveldisflokkin, Kristiliga Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Jógvan Sundstein varð løgmaður. Longu á sumri 1989 skrædnaði samgongan og Sambandsflokkurin kom ístaðin fyri Kristiliga Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Í 1989 var eyðsæð, at kreppa var fyri framman. Baldrut varð at stýra samfelagsskútuni.

Politiskt rok var mangan í 1980-árunum. Málið um SEV útbyggingina í Norðureysturoy var eitt teirra. So hvørt føroyska samfelagið mentist var orkutørvurin á landi øktur. Flakavinnan og smáídnaður mentist, eins og húsarhaldini fingu sær alt fleiri elriknar hentleikar. Av tí at oljan var sera dýr hesa tíðina, var yvirhøvur semja um at byggja vatnorkuna út. Men tað var ikki semja um, hvussu hetta skuldi gerast. Ætlanin hjá SEV var at leiða alt vatnið í Norðureysturoy gjøgnum tunnlar í Eiðisvatn. Onnur uppskot vóru frammi m.a. at savna vatnið einar 150 metrar longur uppi enn Eiðisvatn. Eisini var hugskot frammi at savna vatnið á Veðranesi, norðan fyri Selatræð. Nógv vóru ónøgd við, at SEV og danska felagið Højgaard & Schultz høvdu gjørt avtalu um, at danska felagið skuldi byggja "upp á rokning". Útbyggingin byrjaði í 1984. Hon skuldi kostað einar 200 milliónir, men kom at kostað einar 600 milliónir, tá ið avtornaði.

2. kaldakríggið, sum byrjaði um 1980, bar við eisini í Føroyum. Stríðið var mangan sera hart. Og fleiri sakarmál um ærumeiðing stóðust av hesum. Altjóða spurningar so sum fyri og ímóti apartheid í Suðurafrika vóru frammi í byrjanini av 80 unum. Hóast øll Norðurlond samtyktu bann móti handli við Suðurafrika, so var

stuðulin í Føroyum fyri hesum landi so mikið stórur, at tað ikki eydnaðist løgtingunum at seta bann fyri hesum handli fyrrenn í 1988.

Síðan seinast í 1970-árunum hevði kjak verið um, hvørt donsku ríkisveitingarnar skuldu latast í blokki ella ei. Veitingarnar frá ríkinum til donsku kommunurnar vóru áður lagdar í blokk, og danir kravdu, at føroyingar eisini góðtóku blokkveiting. Sambandsflokkurin var hart ímóti, men í 1988 góðtók føroyska heimastýrið Blokkin. Síðan tá hevur fíggjarlógin betur avmyndað almenna samfelagsraksturin.

**1980 - 1990**

## Búskaparlig viðurskifti

Síðan krígslok hevði búskaparpolitikkurin hjá bretanum John Maynhard Keynes verið tann vanligi í Evropa, Norðuramerika og aðrastaðni við. Tá farið verður inn í 1980-árini, er støðan munandi broytt. Um hetta mundið komu sum fyrr nevnt Reagan í USA og Thatcher í Bretlandi til valdið. Og við teimum kom nýggj búskaparlig hugssjón, monetarisma og supply-side. Skattirnir og sosialútreiðslurnar skuldu lækkast, meðan hernaðarútreiðslurnar skuldu hækkast. Ætlanin var at lætta um hjá vinnulívinum, soleiðis at hugur bleiv til at skapa arbeiðspláss og økja framleiðsluna. Harafturat varð dentur lagdur á at halda inflasjónini niðri. Minni dentur bleiv lagdur á at hava javnvág á fíggjarlóg og gjaldsjavna. Í USA førdi tað við sær, at stórt virksemi var í landinum, men samstundis var mikið hall á fíggjarlóg, handils- og gjaldsjavna.

Eisini í Føroyum nam hetta búskaparrákið við, og tá nýggja landsstýrið tók við í januar 1981, var í samgongubløðum boðað frá "systemskifti". Fyrrapart av 1980-unum vóru oljuprísirnir í hæddini. Hetta tyngdi almikið um hjá vinnulívinum og annars øllum samfelagsbúskapinum. Um somu tíð var útboðið stórvaksið í USA. Við "systemskiftinum" fann Supply-side búskaparpolitikkurin eisini veg til Føroya. Donsk lán (serliga kredittfelagslán) streymaðu til Føroya. Hesi lán, sum í bankaroknskapunum blivu nevnd ábyrgdir/liabilities on guarantees, vuksu frá 269 milliónum í 1980 til 2.840 milliónir í 1988, og nærkaðust tá helvtini av øllum innistandandi í føroysku bankunum. Sparikassarnir vóru við í hesum transaktiónum, men bara um lánarin sjálvur kundi veita ábyrgd/trygd fyri hesum serligu lánum.

Bæði bankar og kundar høvdu vinning av hesum. Lánini vórðu tikin heim til Føroya og sett á bók. Rentustøðið var tá lækkað í Danmark, meðan tað enn var høgt í Føroyum. Útlánsrentan í Danmark var lægri enn innlánsrentan í Føroyum. Harafturat var bara hálvt prosent av innlánsrentuni í Føroyum skattskyldugt. Eisini kundi kundin draga 42% prosent av rentuútreiðslunum frá í persónsskattinum. Soleiðis skaptist eitt fitt avlop við at lána pengar í Danmark og seta á bók í Føroyum. Revisorfyritøkur í Føroyum vóru sera virknar at hjálpa fólki at sleppa undan skatti við at fáa fólk at taka upp slík lán. Men landskassin misti av hesum hundraðtals milliónir í skattainntøkum.

Álvarsligasta samfelagsavleiðingin av ábyrgdarlánunum var tó, at føroysku bankarnir ikki bara kundu seta hesar sløku 3 milliardirnar inn á bók. Ein banki fær sín vinning við at læna út. Tá vanligi føroyingurin og vinnulívið læntu hesar pengar, fóru teir til nýtslu og íløgur og enda sum føroysk uttanlandsskuld.

Hóast ábyrgdarlánini í fyrsta umfari kostaðu landskassanum pengar í mistari skattainntøku, so komu avleiðingarnir, tá pengarnir vóru læntir út til nýtslu og íløgur í Føroyum, at verða øktar toll- og skattainntøkur - pengarnir fóru í umfar. Pengafloymurin gjørdi, at almennu myndugleikarnir vandaðu sær ov illa um

penganýtsluna, umframt at vinnulívið hevði lætt við at leggja trýst politikkarnar. Stuðulin til fiskivinnuna (m.a. gjøgnum Ráfiskagrunnin)
øktist upp í millum 400 og 500 milliónir árliga, og í 1984 svarar stuðulin til umleið triðingin av fíggjarlógini.

Myndugleikarnir vóru eisini í aðramáta við í vinnulívinum. Landskassaveðhøld vórðu givin í stórum tali. Í 1987 vóru veðhaldsskyldur landskassans 2.379 milliónir. Uppi í hesum eru bæði veðhald fyri privata vinnulívið og fyri almennar og kommunalar stovnar.

Sera stór vinnulig framtøk vóru framd hetta tíggjuára skeið, væl stuðlað av landsmyndugleikunum. Fyrrapartin av 1980- árunum vóru tvinni framtøk, eitt í fiskiskip m.a. svartakjaftaskip og eitt í farmaskip. Í 1985 vóru 16 skip avgreidd í sonevnda skipapakkanum. Stórur partur av hesum skipum vórðu fíggjað á sera ivasaman hátt. Fleiri stór sakarmál um hetta vóru í Føroya Rætti seinni. Nógv av hesum skipum fóru seinni á heysin. Landskassin misti hundraðtals milliónir í effektivum veðhaldsútleggum.

Í 1986 var ein lítil roynd at føra Keynesianskan búskaparpolitikk. Nakað av pengum vóru tiknir inn m.a. til oljugrunnin og bundnir uttanlands.

Samanumtikið vóru 1980-árini tíðin, tá Føroyar læntu seg upp frá 1 milliard í skuld í 1980 til 8,5 milliardir í 1990.

**1980 - 1990**

## Sosial viðurskifti

Fólkavøksturin frá 1960unum og 1970unum heldur fram í 1980 unum. Vøksturin er ójavnur kring landið, men tað sermerkta er, at Tórshavnarøkið og Syðra Eysturoy vaksa við størri ferð enn meðaltalið fyri alt landið.

Miðskeiðis í 1980 unum vóru í býráðnum í Havn yvir 2.000 umsóknir at fáa grundstykki. Býráðið royndi at loysa íbúðartørvin við at útstykkja grundstykki/býlingar uppi í Hoyvíkshaganum.

Stóri tørvurin á at fáa tak yvir høvdið, og tað nógv økta peningaumfarið, trýsti húsaleiguprísin, prísin á føstum ognum, serliga í Havn, upp í loft. Prísurin á heilt gomlum húsum var eisini himmalhøgur, og lítil var møguleikin hjá ungum fólki at leiga t.d. eitt kamar fyri ein rímiligan prís. Fyri nýggja sethúsaeigaran var ein hjálpin, at Húsalánsgrunnurin gav bílig langfreistað lán.

Nógv fólk høvdu nógvar pengar um hendur. Lønirnar á landi vuksu sum heild í 80 unum við millum 15 og 20%, og hóast prísirnir eisini vóru høgir, var talan um ein reallønarvøkstur. Fiskimenn fingu tryggjaða dagførda minstuløn og dagstudningsskipan. Til útróðrarmenn, sum ikki mynstraðu, var latin ein minstaforvinningur. Minstaløn og minstiforvinningur vórðu útgoldin prístalsviðgjørd úr landskassanum. Sum ískoyti til lønina læt landskassin prísstudning pr. kilo landaðan fisk til manningar.

Mikli búskaparvøksturin í 80 árunum broytti sosialu viðurskiftini í Føroyum í síni heild. Stóri eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi longdi munandi munandi um arbeiðstíðina hjá løntakarunum og líkindini at passa gomul og óhjálpin heima við hús versnaðu. Tí øktist tørvurin at fáa tilhald á ellisheimi/umlættingarheimi ella røktarheimi. Fleiri slík
heim blivu bygd í 80 árunum. Kortini bleiv tørvurin ikki nøktaður. Í 1983 kom lóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjápnum heima. Henda lóg skapti mikið kjak millum manna, um tað var rætt at materiellisera familjubondini.

Broytingar hendu í lógunum um almenna forsorg, fólka-, avlamis- og einkjupensjón, einkjuhjálp, medisinhjálp o.s.fr.. Onnur viðurskifti hjá teimum eldru vóru eisini broytt t.d. fingu pensjónistar møguleika at fáa bjálvingarstuðul.

Í tíðarskeiðinum hendu eisini broytingar hjá børnum og barnafamiljum. Tá tørvurin á barnaansing øktist so nógv, blivu fleiri dagstovnar/býlingshús bygd. Kortini var tørvurin langt frá nøktaður og tí skipaðu bý- og bygdaráð fyri kommunalari dagrøkt.

Miðskeiðis í 80 unum komu tvær serligar lógir á sosiala økinum. Tann fyrra var broyting í "lógini um dagpening í sambandi við barnsburð og sjúku" og hin seinna var "lógin um barnastyrk", sum vanliga varð nevnd "mammulønin". Dagpeningur hevði síðan 1978 verið veittur lønmóttakarum við óarbeiðsføri, skaða ella barnsburð. Frá 1987 verða lønmóttakandi og ikki lønmóttakandi kvinnur javnstillaðar og hava eftir løgtingslógum frá 1987/88 rætt til dagpening við hægstu

upphædd undir barnsburði, t.e. at eisini ikki-lønmóttakandi kvinnur hava henda rættin í 24 vikur aftan á føðingina. Skattafríur barnastyrkur varð veittur øllum mammum, óansæð egna inntøku ella inntøku hjá manni. Styrkurin varð veittur øllum, sum áttu børn millum 1/2 til 16 ár.

Í samband við at blokkstuðulsskipanin kom í gildi 1. januar 1988, varð serforsorgin yvirtikin. Frá hesari dagfesting stýrdi heimastýrið sjálvt lívsumstøðunum hjá evnaveikum t.d. við at flyta tey úr stórari eind í Havn og í smærri hóskiligari bústovnar í høvuðsstaðnum og aðrastaðni í landinum.

Í mars 1988 verður Samhaldsfastur arbeiðsmarknaðar-eftirlønargrunnur samtyktur á tingi. Endamálið við grunninum er at tryggja øllum 67 ára gomlum og eldri og sum hava fastan bústað í Føroyum, rætt til eftirløn. Inngjaldið er ávíst prosent av lønini, meðan útgjaldið er sama upphæddin fyri øll. Eftirlønin skal eisini skiljast sum eitt ískoyti til fólkapensjónina og stovningartíðarbilið hongur saman við, at blokkurin samstundis kemur í gildi. Grunnurin skuldi spara upp í nøkur ár, áðrenn útgjaldið skuldi byrja. Ætlanin var, at Samhaldsfasti skuldi fara at virka í 1990, men bleiv tó útsettur.

**1980 - 1990**

## Mentanarlig viðurskifti

Í áttatiárunum varð lagdur størri dentur á materiellan framburð enn á mentan. T.d. veksur bilinnflutningurin mangar ferðir skjótari enn bókaútgávan. Men hóast hetta, kýttu føroysku rithøvundarnir seg at skriva um sítt egna samfelag, sum meira ella minni var tikið leyst.

Í grækarismessurøðum, flaggrøðum og skaldskapi varð nortið við støðuna og ávarað um standin. T.d. Kári p: "Nú bløðini skriva várt land fer um koll..." (1984) og Steinbjørn B. Jacobsen: "Hall" (1984). Men tað var sera sjáldsamt, at hesar mentanarligu ávaringar vórðu tiknar í álvara.

Samfelagið í 1980 árunum bleiv ógviliga ringt at hava yvirlit yvir og at fata. Tey higartil kendu bókmentarákini tyktust tí ikki nóg neyvt at kunna nýtast at eyðlýsa nútíðarsamfelagið. Nýrealisma og (post)modernisma vunnu fram og gjørdust høvuðsbókmentarák. Kvinnurnar koma av álvara fram á bókmentapallin og skriva mesta partin av føroyska prosa skaldskapinum í 1980 árunum. M.a.Jóanes Nielsen og Oddvør Johansen skrivaðu nýrealistiskt og m.a Hanus Andreassen og Lydiu Didriksen skrivaðu realistiskar og modernistiskar bókmentir. Rói Patursson og Tóroddur Poulsen vóru høvundar, ið skrivaðu (post) modernistiskt. Krúnan á føroysku bókmentalistini hetta tíggjaáraskeið var, tá Rói Patursson í 1986 fekk Norðurlendsku bókmentavirðislønina fyri yrkingarsavnið "Líkasum".

Eins og so ofta fyrr var kjak um, hvørt undirvíst átti at verið í nøring í skúlunum. Stríðið var hart, og í onkrum skúlum klistraði skúlanevndin síðurnar um seksualundirvísing saman í bókunum, áðrenn næmingarnir fingu tær. Men tað komu eisini út bøkur, ið viðgera seksualitetin á øðrvísi hátt. Eitt dømi var skaldsøgan hjá Høgna av Heiði: "Tað heita summarið"(1987).

Annað kaldakríggið í 1980-árunum økti um krígsóttan millum fólk. Skøldini gjørdu eisini vart seg og yrktu um kjarnorkuvandan og vandan fyri kríggi, um ikki tosað varð saman millum stórveldini. Sum Rói Patursson sigur í yrkingini "Tekstur um okkara tíð" (1984), at “tindarnir líta frá hvør øðrum” og í útsøgnini í somu yrking “vit eru okkara egnu barbarar” er hugburðurin, at hvør einstakur okkara hevur skyldu at taka okkum av hesum hóttandi kríggsvanda eins og øllum øðrum samfelagsspurningum. Tað eru nevniliga ikki altíð hini, sum hava skyldina av, at alt ikki er so gott, sum tað kundi verið.

Materialistiska samfelagið framleiddi í 80 unum nógv rusk og nógva dálking. Fyri fyrstu ferð í Føroya søgu var dálkingin farin at vinna á náttúrukreftunum. Hetta viðger T. M. Smith sera væl og beinrakið í stuttsøguni "Víkin" (1984). Einastu ráðini tyktust nú vera at byggja brennistøðir. Semja fekst ikki um, hvar og hvussu hetta skuldi gerast, so endin bleiv, at ein varð bygd í Havn og ein í Lorvík.

**1990 – 1998**

## Altjóða viðurskifti

Grundarlagið undir altjóðapolitikki í 1990 árunum hevur verið eitt heilt annað enn undir kalda krígnum. Tá vóru tvinni risaveldi, ið royndu at vinna flest møgulig lond fyri síni samfelagsskipan. Heimurin var býttur sundur í Vesturheim og Eysturheim. Aftan á at Berlinmúrurin fall, og Sovjettsamveldið datt sundur, var einans USA eftir sum risaveldi.

Ein onnur avleiðing av at kalda kríggið linkaði og helt uppat, var vaksandi globalisering á øllum samfelagsstigum. Eitt eyðkenni í hesum er, at støðugt fleiri sokallaðir mikrostatir hava tikið fullveldi í trúnni upp á m.a. at liva í friði og framburði.

Tá Irak í 1990 hertók og innlimaði Kuveit í sítt ríki, stóð USA á odda fyri at reka Irak út aftur úr landinum. Seint í februar 1991, samstundis sum Irak varð rikið úr Kuveit, helt George Bush forseti røðu, har hann kunngjørdi, at nýggj heimsskipan var komin. Henda var eyðmerkt av størri trygd og fastari rættargrundreglum, enn vanligt hevði verið í altjóða viðurskiftum. Eftir at kalda kríggið var av, vildi heimssamfelagið undir fyriskipan av ST standa samlað og avgjørt mótvegis samvitskuleysum kúgarum og áleyparum.

At Irak varð rikið úr Kuveit og at Bush setti fram sína yvirlýsing um nýggju heimsskipanina, vóru góð tíðindi hjá øllum smátjóðum, ið royndu at reka óheftan politikk. Vónirnar um brádligt skifti til nýggja heimin vóru ómetaliga stórar. Í 1992 gjørdi ST-herur við USA á odda landgongd í Somalia. Ríkismyndugleikin har var syndraður og óskil, ruðuleiki og hungursneyð valdaðu í landinum. ST-herurin skuldi veita neyðhjálparfelagsskapum trygd og arbeiðsfrið. Uppíleggingin gekk tó ikki sum ætlað. Í Kuveit hevði verið greitt, hvør var vinur og hvør var fíggindi. Soleiðis var ikki í Somalia, har vóru fleiri ættflokkar, ið bardust sín á millum um valdið og í alsamt skiftandi samgongum. Av tí sama var USA stýrdi herurin skjótt hildin at vera í parti við ávísum ættbólkum og fíggindi hjá øðrum bólkum, sum síðani søkti at teimum. Somalia var ikki nakað Kuveit við ovurhondsstórum oljuríkidømi. Tí var innrásin ikki meira enn hálvhjartað og við ov fáum hermonnum og ov lítlari útgerð. ST-tiltakið miseydnaðist fullkomiliga, og í 1995 tók ST seg heilt út úr landinum. Ivaleyst var hetta millum orsakirnar, at teir leiðandi fyri nýggja heimin vóru meira enn stríðsskýggjandi, tá ræðuliga slátrið í Ruanda fram í 1994. Heldur ikki var hugurin stórur at leggja upp í kríggið í gamla Jugoslavia. Leingi himpraðist alheimsssamfelagið, men tá ST gav NATO loyvið at støðga serbisku framferðini í Bosnia, eydnaðist at steðga krígnum har. Enn hevur tað tó ikki borið til at støðga nøkrum av nógvu kríggjunum í Afrika.

Áttatiárini høvdu verið eyðmerkt av politiskum høgraráki. Í nítiárunum vendi rákið eitt sindur móti vinstru. Í 1992 vann Bill Clinton valið í USA, og í 1997 vann

Labour við Tony Blair á odda valið í Bretlandi. Henda sama gongdin hevur verið um meginpartin av Evropa.

At kalda kríggið var av, og nýggj heimsskipan komin ístaðin, gav møguleikar fyri at granska í skjølum frá tíðini undir Kalda krígnum. Í 1997 kom stórt og avdúkandi álit , "Grønland under den kolde krig", ið lýsir og viðger leiklutin hjá hesum landi nevnda tíðarskeið. Í løtuni verður kanning gjørd um støðuna hjá Føroyum hesa tíðina  og í hesum sama høpi. (Svartabók – við fyribils úrslitum av hesum kanningum kom út í 1999).

Nú vit standa á gáttini til nýtt túsundáraskeið, er nýtt stórveldi um at reisa seg í eystri. Fyri umleið 20 árum síðan broytti Kina sín búskaparpolitikk, og síðan hevur sera stór framgongd verið í landinum, oman fyri 10% búskaparvøkstur árliga. Enn er ongin fíggindaskapur íkomin millum Kina og USA, men heldur kinesiska menningin fram, kann kapping teirra millum koma í um heimsins oddasess.

**1990 - 1998**

# Politisk viðurskifti

Politisku/búskaparligu kreppuinntrivini miðskeiðis í 1989 eru eyðsýnd tekin um álvarsliga kreppu í føroyska búskapinum. T.d. fingu vit fleiri ymsar eykaskattir, eykatollir og tvingaða uppsparing. Sjálvvirkandi prístalsreguleringin, ið hevði virkað síðan 1939, varð tikin av. Við inntrivunum bleiv stórur partur av tí, sum var í peningarenslinum, tikið burtur. Ein partur av hesum pengum hevði á politiskum stigi verið latin fiskivinnuni (ráfiskagrunninum).

Tann 12. September 1990, sama dag sum føroyska fótbóltslandsliðið í svenska býnum Landskrona skakaði allan fótbóltsheimin við at vinna 1-0 á eysturríki í EM-undankappingini, var landsstýrið á politiskum loynifundi í Keypmannahavn. Landsstýrið bað donsku stjórnina um hjálp til at bjarga føroyska búskapinum. Stjórnin bað landsstýrið fyrireika seg betur og so koma niður aftur um ein mánaða við uppskoti um kreppuloysn. Men í Føroyum varð samgongan ikki samd um kreppupolitikkin og 5. Oktober skrædnaði hon.

Um somu tíð skipaði danska konservativa Schluterstjórnin ein serfrøðingabólk, Færøgruppen, at koma við tilráðingum um, hvussu likviditetstrupulleikin í Føroyum best kundi loysast. Arbeiðsgrundarlagið hjá Føroyabólkinum vóru árligu frágreiðingarnar hjá "Ráðgevandi nevndini" hjá forsætismálaráðnum umframt bráðfeingisbrøv á sumri 1990 frá formanninum í Ráðgevandi nevndini til statsministeriið og eisini bráðfeingisfrágreiðingar frá ríkisumboðsmanninum. Hesin bað donsku stjórnina ikki vera ov lagaliga viðvókjandi lánitreytum til landsstýrið, tí "…Landskasseunderskuddet i 1991 vil med stor sandsynlighed blive af mindst samme størrelsesorden som i år (1990). Også i de efterfølgende år er betydelige underskudsandsynlige, og man må derfor frygte, at behovet for evt. dansk medvirken ved låneoptagelse vil vise sig i gentagne senere situationer" (Notits til brug ved statsministerens samtale med Færøernes lagmand den 12. September 1990, kl. 1430. Bræv frá "Rigsombudsmanden på Færøerne, 12. September 1990").

Endamálið hjá donsku stjórnini við Føroyabólkinum var at fáa tamarhald á føroyska búskapinum eina ferð med alla og á ein hátt, at hetta kostaði dønum sum minst. Danska fíggjarmálaráðið metti tann 12. Oktober 1990, "at en manglende færøsk betaling på internationale lån vil kunne påvirke statens kreditværdighed" (Notat hjá fíggjarmálaráðnum, "Færøernes likviditetsproblem – oktober 1990").

Á løgtingsvalinum tann 17. November 1990 gjørdist javnaðarflokkurin størsti flokkur og skipaði í januar 1991 samgongu saman við fólkaflokkinum. Hesir báðir flokkarnir høvdu nú 17 av 32 løgtingslimum.

Tann 11. September 1992 lótu danir føroyingum rættin til møgulig ráevni í føroysku undirgrundini. Ein av treytunum her var, at kappingarførar danskar

privatfyritøkur skuldu hava framíhjárætt til møguliga olju – og/ella gass framleiðslu við Føroyar.

Tann 6. Oktober 1992 var føroyska heimastýrið sett undir umsiting av nýggja kreditorinum, tí danska statskassanum.

Í apríl 1993 skrædnaði samgongan og javnaðarflokkurin, tjóðveldisflokkurin og sjálvstýrisflokkurin gjørdu nýggja samgongu. Henda samgonga helt til mei 1994, tá ein løgtingslimur í sjálvstýrisflokkinum tók seg úr hesum flokki og samstundis tók hann seg úr samgonguni, og harvið varð nýval útskrivað.

Sambandsflokkurin varð tann flokkur, ið fekk størstu undirtøkuni á valinum tann 7. Juli 1994. Hann fekk 8 tinglimir. Eftir drúgvar og at enda úrslitaleysar samráðingar við aðrar borgarligar flokkar skipaði sambandsflokkurin tann 11. September samgongu saman við sjálvstýrisflokkinum, verkamannafylkingini og javnaðarflokkinum. Hesin seinast nevndi flokkurin, ið hevði 10 løgtingslimir valskeiðið 1990 – 94, fekk bert 5 løgtingslimir hesaferð. Ein av orsøkunum var, at nógvir javnaðarveljarar og serliga fakfelagsleiðarar vóru so ónøgdir við førda politikk javnaðarfloksins, at nøkur teirra stovnaðu nýggjan flokk, verkamannafylkingina. Hendan fylking fekk 3 løgtingslimir í 1994. Í verkamannafylkingini varð 1995 – 97 innanhýsis stríð, sum endaði við, at tveir løgtingslimir teirra blivu ekskluderaðir úr fylkingini, men hildu fram sum samgongulimir.

Rættiliga skjótt kom eisini ólag í samgongusamarbeiðið. Í 1996 tók javnaðarflokkurin seg úr Tinganesi og fólkaflokkurin fór í samgonguna í staðinfyri. Ein grundgevingin til at javnaðarflokkurin tók seg úr samgonguni var bygnaðarbroytingarnar við sonevndum aðalstýrum, sum flokkurin metti fór at kosta ov nógv. Í 1995 høvdu Føroyar fingið nýggja stýrisskipanarlóg við ráðharraábyrgd og parlamentarismu. Stýrisskipanarlógin gevur løgmanni størri vald enn higartil, hann fekk nú sama vald sum alt løgtingið. Í 1997 hendi so tað, at løgmaður koyrdi ein landsstýrismann í sjálvstýrisflokkinum úr starvi, tí hesin sambært løgmann arbeiddi ov nógv í sjálvdrátti t.d. í málinum um undirsjóvartunnil um Vestmannasund. Av hesum tók sjálvstýrisflokkurin stuðul sín til samgonguna aftur og henda misti tískil meirilutan á tingi. Samgongan helt tó fram eina tíð enn.

Í sambandsflokkinum var eisini um hetta mundið stór innanhýsisósemja, har eitt løgtingsumboð teirra meldaði seg úr flokkinum fyri síðan at sita uttanflokka. Men júst undan útskrivingina av nývali á vári 1998, var hesin løgtingsmaður blivin partur av fólkaflokkinum. Beint fyri løgtingsvalið 1998 fóru eisini bæði ekskluderaðu løgtingsumboðini í verkamannafylkingini, annar landsstýrismaður, inn í javnaðarflokkin. Og beint fyri sama valið, fór eitt løgtingsumboð fyri kristiliga fólkaflokkin í Suðuroy inn í fólkaflokkin. Hóast hesin seinast nevndi flokkur fekk størsta atkvøðutalið sítt í 40 ár í Suðuroy, snávaði hann. Fólkaflokkurin manglaði bert 5 atkvøður at fáa løgtingsumboð har í oynni.

Ein av orsøkunum til politiska turbulensin í Føroyum í 1990 unum liggur ivaleyst í ósemjum um samfelagsligu inntrivini at fáa búskapin upp á rættkjøl. Ein onnur orsøk liggur eisini í teimum treytum, sum donsku stjórnirnar løgdu á politisku myndugleikarnar í Føroyum í kreppuavtalunum frá oktober 1992, februar 1993, mei

1993 og oktober 1993. Avtalurnar avmarkaðu møguleikarnar hjá løgtinginum at lóggeva og landsstýrinum at útinna mál, sum sambært heimastýrislógina vóru føroysk sermál.

Í november 1994 vóru samráðingar millum nývalda landsstýrið og donsku stjórnina. Hesar samráðingar høvdu m.a. við sær, at bondini, ið landsstýrið var lagt í, í ávísan mun vórðu loyst upp. M.a. kom Framtaksgrunnurin burtur úr hesum.

Í einum máli tyktist løgtingið í 1990 unum at standa saman sum ein maður. Tað var málið um partabrævabýtið í Føroya Banka. Í løgtinginum og í Føroyum sum heild var stórur ivi um virðið og keypsprísurin á bankanum samsvaraðu, og spurningur var eisini, um keypsfortreytirnar og mannagongdin annars var í lagi. Eitt samt løgting samtykti í 1995, at bankamálið skuldi kannast av dómarum. Men meiriluti var ikki fyri hesum í fólkatinginum, sum heldur vildi hava eina óvilduga serfrøðingakanning. Løgtingið gav eftir fyri danska trýstinum.

Bankakanningarúrslitið, Grønborgsrapporten, fleiri túsund blaðsíður, varð almannakunngjørt í januar 1998. Nógvir føroyingar tolkaðu kanningarúrslitið soleiðis, at danska sosialdemokratiska Nyrupstjórnin, fíggjareftirlitið og Den Danske Bank høvdu dult fyri landsstýrinum, at fíggjartørvurin hjá bankanum var munandi verri enn upplýst var landsstýrinum við bankakeypinum. Endamálið var, at danska stjórnin og Den Danske Bank skuldu sleppa so snikkaleys sum gjørligt burtur úr samfelagskreppuni í Føroyum. Landsstýrið, við sambandsmanninum Edmundi Joensen á odda, stevndi donsku stjórnina við kravi um endurgjald fyri at landsstýrið varð villleitt í sambandi við keypið av Føroya Banka

Nýkolonialisma t.e. niðurbinding av føroyskum sjálvræði, ágangur í donskum fjølmiðlum mótvegis føroyingum, donsk politisk niðurgerðing og eyðmýking av føroyskum myndugleikum, serliga í bankamálinum, skapti tilsamans eitt sjálvstýrisrák í Føroyum. Har afturat styrkti føroysk sjónvarpssendirøð um bankamálið, bygd á samansvørjing millum danska fíggjarheimin, donsku stjórnina og serfrøðingar hennara og so vónin at finna olju í undirgrundini, sjálvstýrishugan í føroyingum. Hetta varð eyðsýnt á løgtingsvalinum, sum løgmaður hevði útskrivað tann 30. Apríl 1998.

Á løgtingsvalinum blivu sjálvstýrisflokkarnir tjóðveldisflokkurin og fólkaflokkurin størstir við 8 tinglimum hvør. Tann 9. Mei 1998 gjørdu hesir flokkar samgongu, saman við sjálvstýrisflokkinum. Samgonguskjalið er sermerkt við tað, at Føroyar skulu loysa frá Danmark. Føroyskt fullveldi skal setast á stovn.

10. juni 1998 varð aftur ein avtala gjørd millum nývalda sjálvstýrislandsstýrið og donsku stjórnina. 10. Juniavtalan tekur burtur allar treytir, sum danir í aðurnevndu avtalum áløgdu føroyingum. T.d. kann landsstýrið nú aftur taka uttanlandslán og veðhalda, uttan at spyrja danir eftir. Eisini danska ríkisveðhaldið fyri føroysku peningastovnarnar varð tikið aftur. Hetta hevði staðið við síðan 1992. Avtalan inniheldur fyri føroyingar annars eina góða skipan viðvíkjandi afturgjalding av skuldini til danska statin, umframt at vit hava fingið endurgjald fyri óreglusama háttin, ið nýttur var, tá Fíggingargrunnurin keypti Føroya Banka. Aftur fyri tók landsstýrið stevningina aftur í móti donsku stjórnini.

**1990 – 1998**

## Búskaparlig viðurskifti

Síðan 1975, tá Ráfiskagrunnurin kom, høvdu vanligar marknaðarkreftir ikki verið í gildi í fiskivinnuni í Føroyum, serliga ikki fyri nærfiskiveiði og flakavirkisframleiðslu. Studningurin stýrdi í alsamt vaksandi mun fiskivinnuni. Umleið 1990 var øll orkan í samfelagnum uppi. Nú mátti leggjast á annan bógv, studningurin mátti skerjast. Fyri at fáa hægri avreiðingarprís varð farið undir telefonuppboðssølu í 1990. Tiltakið eydnaðist ikki so væl at byrja við. M.a. tí at flakavirkini, ið skuldu kappbjóða um fiskin, sótu í skuld upp undir hendur; toskaveiðan minkaði niður á eitt søguliga lágt støði; fiskaprísirnir fullu nógv, av tí at stórar nøgdir av russiskum ótilvirkaðum fiski kom á evropeiska marknaðin, og har afturat hugsaðu nógv í fiskivinnuni framvegis meir í nøgd heldur enn dygd og prísi. Men síðan fiskurin kom aftur, og prísirnir somuleiðis hækkaðu, hevur uppboðssølan yvirhøvur riggað væl.

Í 1990 er skuldin hjá føroyska samfelagnum til útheimin í hæddini. Nettoskuldin er 8,5 milliardir krónur og renturnar av hesum umleið 900 milliónir. Slakar 3 milliardir vóru spekulasjónslán settar í føroysku pengastovnarnar at renta. Tá rentuskattaskipanin loksins varð broytt í januar 1991, loystu spekulasjónslánini seg ikki longur, og skjótt minkaðu hesi bankaveðhildnu lán burtur í onki. Men av tí at bankarnir høvdu lánt pengarnar út til vanligar kundar í Føroyum, og hesir høvdu brúkt pengarnar, skapaðist ein øgiligur likviditetstørvur. Hetta hendir samstundis, sum at tað ikki ber til at lána fleiri pengar uttanlands. Virksemið í landinum bóltar niður. BTÚ minkar við meir enn fjórðingi frá 1988 til 1994.

At vinnuligu- og fíggjarligu viðurskiftini vórðu so út av lagi, mátti føra við sær, at hóttandi búskaparliga óløgið breyt. Í oktober 1992 fór Sjóvinnubankin á heysin, og um ikki landskassin setti pengar í, læt bankin aftur. Landsstýrið fór til Danmarkar at samráðast við ríkisstjórnina. Tað vísti seg, at stjórnin var til reiðar og var sera væl fyrireikað. Stjórnin vildi einans læna føroyingum neyðugu pengarnar, um føroyingar gingu undir harðar búskaparligar og politiskar treytir, og sum í veruleikanum settu føroyska samfelagið undir umsiting. Aftur í februar, mei og oktober 1993 eru nýggjar samráðingar millum donsku stjórnina og heimastýrið. Til samans læna føroyingar 2, 7 milliardir úr ríkiskassanum at spræna inn í føroyska bankakervið.

Aftur fyri verður føroyska samfelagið fullkomiliga broytt. Javnvág skuldi fáast á fíggjarlógina, hetta hóast hesi árini var svartasta fiskaloysi síðan Føroyar gjørdust fiskivinnusamfelag. Føroya Banki og Sjóvinnubankin skuldu leggjast saman í ein, eigari var Fíggingargrunnurin frá 1992. Landsstýrið hevði goldið allan partapeningin.
Í oktober 1993 letur fíggjareftirlitið Fossbankan aftur.

Fiskavirkini skuldu savnast í eitt móðurfelag, Føroya Fiskavirking. Tá hetta nýggja felag fór á heysin 1995?, var tað bjargað av Framtaksgrunninum frá 1994, sum

stjórnin og landsstýrið áttu í felag. Og tá ið landsins einaferð sterkasta fyritøka, Føroya Fiskasøla, fór á heysin, varð hon eisini bjargað av hesum sama Framtaksgrunni. Føroyar eru sostatt í dag á mangar mátar eitt øðrvísi samfelag enn okkara grannalond. Landið eigur og rekur báði landsins størsta banka, fiskavirki og fiskasølu.
Sum nevnt kravdi stjórnin, at føroyingar skuldu fáa javnvág á fíggjarlógina sum skjótast, og í hvussu so er í seinasta lagi í 1998. Tað bar við sær, at landskassahallið upp á góðar 700 milliónir í 1991 er burtur longu í 1995. Men prísurin var høgur hjá Føroyafólki. Tað almenna segði nógvum fólki upp og arbeiðsloysið øktist. Hetta minkaði um búskaparliga peningarenslið, sum so aftur rakti inntøkur landskassans. Skattatrýstið øktist munandi úr 42% í 1991 til 55% í 1993, tá eru gjøldini til Samhaldsfasta og ALS-skipanina ikki íroknað. Í 1993 var Fíggjarognaravgjald sett á innistandandi pengar, ið føroyingar áttu báði í Føroyum og í útlondum. Fíggjarognaravgjaldið rakti fólk, ið áttu pengar á bók, og mong vóru óð. Í 1997 var Fíggjarognaravgjaldið tikið av aftur.

Í 1998 gjørdu landsstýrið og danska stjórnin avtalu um, at føroyingar skuldu fáa 1,4 milliardir í endurgjaldi fyri mátan, sum Føroya Banki bleiv keyptur. Býtt sundur soleiðis, at 900 milliónir vóru fyri bankakeypið og hinar 500 milliónirnar vóru eftirgivin skuld. Nettouttanlandaskuldin hjá Føroyum er m.a. av hesum og av sera stórum gjaldsjavna yvirskoti minkað úr heimsins hægstu skuld í 1990 (roknað fyri íbúgvan) til at vera burtur í 1998. Hóast uttanlandaskuldin var burtur, skyldaði almennu Føroyar t.e. landsstýrið og kommunur umleið 4 milliardir í 1998. Samstundis áttu ávísir privatir persónar í Føroyum 4 milliardir í útlondum.

**1990 – 1998**

**Sosial viðurskifti**

Í seinnu helvt av 1980 unum var dýrtíð í Føroyum. Lønarvøksturin var umleið 7% um árið. Prísvøksturin var knapt so stórur. Nógv olja er á marknaðinum. Samstundis fellur dollarin niður í helvt. Hetta ger, at oljuprísurin er sera lágur. Fólk spentu boðan høgt, settu seg fyri stórum og dýrum lánum til sethús, bil, uttanlandsferðir og hvørt av sínum. Føroyingar høvdu ein av heimsins hægstu livifótum. Fá høvdu væntað eina so ógvusliga samfelagskreppu, sum skuldi koma handan sýn. Kreppan kom so og kollrendi tilveruna hjá teimum flestu, sum stóðu í skuld og teimum, sum mistu arbeiðið.
Fram til 1992 var ongin almenn arbeiðsloysisskipan í Føroyum, tí fingu arbeiðsleys kontanthjálp eftir grein 9 í forsorgarlógini. Arbeiðsloysið byrjaði so smátt at vaksa í 1988 og í 1992 fingu 2.423 fólk kontanthjálp (frágreiðingin hjá ríkisumboðsmanninum 1994). Henda gongd vísti týðiliga tørvin á eini arbeiðsloysisskipan. 1. August 1992 var Arbeiðsloysisskipanin (hereftir ALS) sett á stovn. Tá vóru umleið 20% av allari arbeiðsmegini í Føroyum í arbeiðsloysi. Talið á fólki í vinnu fellur við meiri enn einum triðingi frá 1989 til 1994.
ALS er ein privat skipan við tvingaðum limaskapi og partarnir á arbeiðsmarknaðinum, arbeiðstakari og arbeiðsgevari guldu 2,75% hvør í skipanina. Tað vísti seg skjótt, at útgjaldið bleiv nógv størri enn inngjaldið. Útgjaldið lækkaði eina tíð, men tá hetta ikki batti, lænti skipanin pengar frá frítíðargrunninum og tí nýskipaða Samhaldsfasta Arbeiðsmarknaðar Eftirlønargrunninum. Seinast nevndi grunnur skuldi verða ískoyti hjá fólkapensjónistum. At Samhaldsfasti á henda hátt lænti pening út, gjørdi tað, at útgjaldið til fólkapensjónistarnar varð útsett.
